# MIÐ & MAGN

Nr. 21 • Juli 2014

Føroya Skipara- og Navigatørfelag & Maskinmeistarafelagið



**ÚTGEVARI**
Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag geva MIÐ & MAGN út í felag.
Blaðið verður sent limunum og teimum, sum tekna hald.
4 útgávur eru um árið.

**BLAÐNEVND**
Eyðstein Djurhuus, *ábyrgdarblaðstjóri*
Páll Hansen
Annfinn Garðalíð
Jóan Petur Patursson

**MASKINMEISTARAFELAGIÐ**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Telefon 314718
Teldupostur: mf@mf.fo

**FØROYA SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAG**
Jekaragøta 10
Postboks 248
110 Tórshavn
Telefon: 316973
Teldupostur: fsn@fsn.fo

**BLAÐHALD**
Tey, sum ynskja at halda MIÐ & MAGN, kunnu boða frá hesum í teldupost til: info@midogmagn.fo
Haldara gjaldið er 200,- kr. um árið, tað er fyri 4 bløð.

**ENDURGEVING**
Tað er loyvt at endurgeva tekst úr MIÐ & MAGN, tá keldan verður upplýst.
MIÐ & MAGN kann heintast í PDF á heimasíðunum hjá feløgunum:
www.mf.fo
www.fsn.fo



**FORSÍÐUMYND**
Regin Olsen, næstformaður í Maskinmeistarafelagnum

**PDF ÚTGÁVA**
Mið og Magn kann ókeypis heintast sum PDF á:
www.fsn.fo
www.mf.fo

**UMSITING**
Sp/f MEDIA
info@midogmagn.fo

**UMBRÓTING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ**
Føroyaprent · www.foroyaprent.fo

Upplag: 1.850

# Tvangsarbeiði innan fiskiskap – nýggja trælahaldið

*Eyðstein Djurhuus, ábyrgdarblaðstjóri*



Síðani 1930 hevur ST felagsskapurin fyri arbeiðsviðurskifti ILO (International Labour Organisation) arbeitt miðvíst fyri at støðga øllum sløgum av tvangsarbeiði.

Hetta slagið av arbeiði verður allýst sum, „ein støða har ein persónur verður tvingaður, lumpaður ella fasthildin í einari starvstøðu, sum hann ikki kann koma burtur úr“

Grundarlagið hjá ILO í hesum arbeiði eru hesar báðar samtyktirnar. ILO Convention no 29 frá 1930 um tvangsarbeiði og ILO Convention no 105 frá 1957 um at avskaffa øll sløg av tvangsarbeiði. Hesar samtyktir eru bindandi fyri øll heimsins lond.

ILO reglurnar siga, at tvangsarbeiði kann verða eyðmerkt, tá hesi ting síggjast:

- Møguleikin hjá starvsfólki at sleppa burtur er avmarkaður
- Samleikaskjøl verða afturhildin
- Likamligur, sálarligur og kynsligur ágangur verður framdur
- Starvsfólk verða lumpað inní eina skuldarbinding, sum tey ikki kunnu koma burtur úr

Serligu viðurskiftini umborð á fiskiskipum gera fiskimenn sera sárbarar fyri hesum ódámliga hátti at skipa arbeiði. Skipini er burtur langa tíð og eru isoleraði frá umheiminum. Lætt er at gera sær dælt av holum í løggávuni, tí talan er sum oftast um virksemi í fleiri londum samstundis.

Fiskimenninir eru langt burturi heimanífrá og ongin er at tala teirra søk. Øll hesi viðurskiftini tilsamans geva góðar gróðrarumstøður til nýggja trælahaldið.

Føroysk arbeiðsmegi hevur altíð fingið virðilig kor at virka undir, tá vit eru farin út um landoddarnar at vinna til lívsins uppihald. Tí skylda vit eisini at geva teimum, sum koma til okkara góðar og tryggar umstøður at virka undir.

Mið og Magn vil takka teimum løgtingslimum, sum miðvíst og áhaldandi arbeiða fyri at tryggja øllum fiskimonnum við føroyskum skipum, hóskandi lønar- og setanartreytir.

Haldið á, fyrr ella seinni fer tað at bera á mál.

*Kelda: www. Itfglobal.org/fisheries*

*Vegna Mið og Magn*
*Eyðstein Djurhuus, ábyrgdarblaðstjóri*







# Innihaldsyvirlit

| | |
|---|---|
| Tvangsarbeiði innan fiskiskap – nýggja trælahaldið | 2 |
| Maskinmeistarar á aðalfundi | 4 |
| Fyrstu royndirnar at reka skipsfiskiskap | 12 |
| Brennidepilin: Petur Skeel Dahl | 14 |
| Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum | 16 |
| Tíðindi frá Skipara- og Navigatørfelagnum | 18 |
| Føðingardagar hjá limum okkara | 20 |
| Sjóvinnustyrið | 22 |
| Alternativ orka | 24 |
| Gardinbátar | 28 |
| Vanlukkan umborð á Anitu | 30 |
| Vinnuháskúlin: Prógvhandan | 32 |









# Ársfrágreiðing formansins á aðalfundinum 8. mars 2014



## Sáttmálasamráðingar

Vit hava haft, ikki minnið enn, sjey ymiskar sáttmálasamráðingar á skrivstovuni, fleiri av samráðingunum vóru drúgvar, onkrar heilt upp í 9 umfør.

Tá eg segði sjey, so dragar tað seg bert um tað almenna og KAF.

Viðvíkjandi fiskiflotanum samráddust vit við hvønn skipabólk sær – í alt 8. Hesar vóru á skrivstovuni hjá FF, so man kann gott siga, at vit hava haft 15 ymiskar sáttmálasamráðingar síðan síðsta aðalfund. Menn hava haft gott tol. Eg skal koma nærri inn á hesar, men fyrst nøkur orð um nýggju semingslógina.

## Nýggj semingslóg

Í 2013 fingu vit nýggja semingslóg. Gamla lógin var frá 1928 og hevði sostatt 85 á baki, so tíðin var nokk komin til eina nýggja, sum hóskar betur til arbeiðsmarknaðin og samfelagið í dag.

Hon ásetur, at nú er sami semingsmaður bæði á almenna og privata arbeiðsmarknaðinum. Hesin hevur loyvi til at seta varasemingsmenn um fleiri semingar fara fram samstundis. Feløgini skulu ikki gjalda fyri semingsmenninar. Tað gerð tað almenna.

Undir viðgerðini á tingi um hesa lóg, mótmæltu fleiri fakfeløg ímóti fráboðanarfreistini, sum var sett til 4 yrkadagar í lógaruppskotinum.

Endin var, at tingið lat upp til partarnar í sáttmálasamráðingunum at koma fram til eina hóskandi fráboðanarfreist Hetta er síðani hent í teimum sáttmálum, sum eru gjørdir.

## Fiskiflotin

Fyrsta ársfjórðing í 2013 blivu nakrir sáttmálar framlongdir 2 ár, tó blivu sáttmálarnir fyri tann pelagiska flotan og verksmiðjutrolarar framlongdir til 1. januar 2014.

Manningarfeløgini kravdu undir samráðingunum, at allir skipabólkar undirskrivaðu felagsreglurnar, samstundis sum sáttmálin bleiv undirskrivaður. Tað tók nakað av tíð at fáa avtalu fyri partrolarar og lemmatrolarar, men við hjálp frá semingsmonnunum og góðum toli, komu eisini hesar avtalur upp á pláss.

Tað vóru eisini í 2013 nakrir reiðarar, sum undir makrelfiskiskapinum ikki vildu halda sáttmálarnar. Onkur av hesum var ikki limur í Føroya Reiðarafelag, og ein avleiðing av tí var, at manningarfeløgini fyrst í september mánað í fjør lýstu mynstringarbann móti trolaranum „Edna“ Hetta bleiv gjørt tí skipið ikki helt sáttmálan.

Hesin reiðarin hevði boðað frá, at hann ikki var limur í Føroya Reiðarafelag, og tí var ongin sáttmáli galdandi fyri hann. Realurin hevur síðan keypt „Ednu“ í Fútarættinum. Tann 1. mai 2013 varð stjóri settur í Føroya Reiðarafelag. Stutt eftir hetta varð ynski sett fram um at seta ein arbeiðsbólk við tveimum persónum frá hvørjum felag at endurskoða allar felagsreglur fyri fiskiskip, og samstundis fáa viðurskiftini við Føroya Reiðarafelag í rætt lag aftur.

Fyrsta stig á hesi leið bleiv tikið fyrst í januar í 2014, og samstundis blivu sáttmálar og avtalur framlongdar árið út, so at allir sáttmálar ganga út samstundis.

Arbeiðið í hesum bólki var ikki byrjað áðrenn aðalfundin, og tað er spell. Nógvu fundirnir um makrelin eru helst orsøkin til drálið. Men nú halda vit, at vit kunnu siga fyri vist, at byrjað verður fyrsta dagin.

Tey síðstu 2-3 árini hevur nógv verið tosað um tilfeingisgjald. Haldi man skal gera sær greitt, at tilfeingisgjald er komið fyri at vera. Helst hevur man ikki funnið tann rætta leistin enn, tað tykist sum um, myndugleikarnir trilva seg fram í móti eini endaligari loysn.

## Føroya Reiðarafelag fyri Farmaskip FAS

Hóast samráðingarnar byrjaðu fyrst í mars í fjør, blivu hesar sera drúgvar, og vit komu út í juni mánað, áðrenn nýggir sáttmálar vóru undirskrivaðir. Manningarfeløgini samráddust saman um hendan sáttmálan.

Eitt av høvuðsmálunum til hesar samráðingar var, at man vildi síggja, at sáttmálalønin kom nærri tí veruligu lønini. Hetta var serliga galdandi fyri senior- yvirmenninar. Vit vístu á, at hýran hjá einum senioryvirmanni í FAS lág u.l. 15 % lægri enn hjá einum kollega í NIS.

Reiðaríini vóru nokk greið yvir hendan trupulleika.

Partarnir vóru skjótt greiðir yvir, at lønartalvan mátti broytast og serstøk lønartalva gerast fyri frálandavinnuna. Tað blivu síðan gjørdar tvær lønartalvur, har tað eru færri bólkar.

Áðrenn talvan fyri frálandavinnuna bleiv gjørd, blivu viðbøturnar hjá yvirmonnunum umroknaðar til at verða ein prosent part av lønini, og síðani vórðu tær lagdar inn í nýggju lønartalvuna.

Í januar og februar 2014 var fundur við manningarnar hjá Team Beredskap. Teir høvdu biðið um fundin. Sera góður og áhugaverdur fundur har millum annað varð komið inn á spurningin um eftirløn, norskt lønarlag og limagjald. Tað vóru eisini aðrir spurningar, sum vóru uppi og vendu. Partarnir vóru samdur um at hava ein slíkan fund árliga fyri øllum manningunum við skipum innan frálandavinnuna.

## Strandferðslan

Sáttmálasamráðingar við Fíggjarmálaráðið byrjaðu fyrst í september 2013. Tað var beinanvegin púra greitt fyri okkum, at arbeiðstíð og hvílutíð komu at verða høvuðstrupulleikin.

Høvuðskravið hjá okkum var eisini, at arbeiðstíðin skuldi fara frá 98 tímum um vikuna niður í max. 91 tímar um vikuna, fyri at kunna halda nýggju reglurnar um hvílutíð. Hesar samráðingar slitnaðu rættuliga skjótt, og semingsmaðurin bleiv boðsendur. Sáttmálasamráðingarnar millum FSN og SSL vóru slitnaðar stutt framanundan.

Semingsmenninir mettu, at tað var skilabest at knýta semingina fyri yvirmannafeløgini saman. Teir boðaðu síðan til fundar í deplunum í Skálavík. Har høvdu vit tað gott, og tá ið vit høvdu samráðst í knapt trý døgn, bleiv eitt semingsuppskot lagt fyri partarnar.

Hendan semja bleiv síðan undirskrivað umborð á Teistanum mitt í Skopunarfirði.

Semingsuppskotið var ein 3 ára sáttmáli við eini fráboðanarfreist uppá 48 tímar, og avmarkaðari sigling í eitt tíðarskeið.

Undir hesum samráðingunum upplivdu vit ein „diktatoriskan“ atburð frá vinnumálaráðharranum á tingsins røðarapalli. Hetta var ikki fyrstu ferð, at hann hevur hótt við politiskari uppílegging.

Vit hava fleiri ferðir roynt at fingið fund við Lønardeildina, um endaliga undirskriving av sáttmálanum fyri SSL, men tað hevur verið trupult at fingið samband við nakran á Lønardeildini.

## Magnus Heinason

Vit høvdu góðar vónir um at fáa nakrar smávegis broytingar í sambandi við sáttmálan, sum er galdandi fyri Magnus Heinason, men her skifti Lønardeildin brádliga meining og trekti í land aftur.

Men vit kunnu gleðast um, at nú er eftirlønin 15 %.

Magnus Heinason lág ein part av árinum í fjør, men tað eru nú játt-



*Nógvar atkvøðugreiðslur vóru á aðalfundinum.*



*Nevndarlimir frá vinstru: Jón F. Johansen, John Højsted, Jóan Petur Patursson, Regin Olsen og Páll Hansen.*

aðir pengar til Magnus, so at Havstovan kann leggja til rættis fulla kanningarætlan í 2014.

## Vørn

Hóast vit hava haft 10 samráðingarumførþ, og hava spurt eftir støðuni hjá Jørgin Niclasen m.a. í sambandi við umflokkingar og 6. frívikuna, hava vit ikki fingið nakað svar. Vit fáa bara at vita, at Jørgin Niclasen er rættuliga upptikin av m. a. samráðingum. Meðan hetta verður skrivað er sáttmáli ikki undirskrivaður.

Sáttmálin ásetir millum annað, at frítíðarreglurnar eiga at vera tær somu sum fyri tænastumenn landsins.

## SEV/ Alment lønt á landi

Hesar samráðingarnar byrjaðu fyrst í september 2013, og blivu nakað drúgvar. Ein orsøk til tað var, at samráðingarnar blivu steðgaðar, meðan seming var um skipini hjá SSL.

Í fyrstani vóru samráðingarnar førdar hvør sær, men krøvini vóru so ymisk, at eftir nakrar fundir var greitt, at ikki fór at bera til at hava felags lønartalvu framyvir.

Síðani vóru samráðingarnar lagdar saman, so at Lønardeildin eisini sat við borið. Í SEV sáttmálanum vóru nøkur krøv, sum høvdu ein kostnað við sær, millum annað umflokkingar og niðursett arbeiðstíð fyri vaktgangandi meistarar. Karmurin var ikki serliga stórur, so tað var ikki nógv at flyta runt við.

Nýtt í hesum sáttmála er, at nú er IRF beinleiðis nevnt í sáttmálanum.

Í 2001 gjørdu IRF og MF eina avtalu um, at IRF fylgdi SEV sáttmálanum. Hettar er nú gjørt sjónligt.

## Grønland

Í viku 6 hevði MF fundir í Ålborg við Polar Seafood um sáttmála fyri Polar Princess. Fundur var eisini við teir av maskinmeistarunum, sum vóru hjá skipinum. Vit samdust við Polar Seafood um at brúka gamla APK sáttmálan og umskriva hann soleiðis, at hann samsvaraði við tann føroyska.

Avtalurnar fyri botnfisk og pelagiskan fisk eru eftir teimum føroysku sáttmálunum. Ongin sáttmáli er undirskrivaður enn, men tað er ein góður dialogur millum partarnar, so vónandi fáa vit hettar avgreitt skjótt.

## Skrivstovan, pengar og ognir

Tær nógvu avtalurnar og sáttmálarnir, sum eru gjørdir í farna árið, skaptu eitt stórt virksemi í felagnum í 2013, og hava nevndarlimir brúkt nógva tíð uppá samráðingarnar.

Nakað av viðlíkahaldsarbeiði er eisini fari fram á ognunum hjá felagnum. Nøkur vindeygu og hurðapartí vóru skift út fyrst í 2013, og øll tann niðara hæddin er málað innan. Hetta er fyrstu fer vit gera tað síðan vit keyptu húsið. Eisini er gjørt eitt nýtt fundarrúm á ovaru hæddini og fundarborðið og stólar eru samstundis skiftir út í niðaru hæddini. Ætlanin er at fáa húsini málað uttan í summar.

Vit eru í dag 534 virknir limir í felagnum og 163 hvílandi limir. Samla eru vit sostatt 697 limir. Limatalið hevur verið sera stabilt tey seinastu árini.

Fíggjarviðurskifti hjá felagnum eru eisini sera stabil. Yvirskotið kann svinga nakað frá ár til ár, alt eftir hvat virksemi er í felagnum. Samanumtikið kann sigast, at fíggjarstøðan er góð hjá felagnum.

## FMU

Tað hevur verið nakað av fundarvirksemi í FMU. Ein partur hevur serliga snúð seg um broytingar í § 9 í FAS lógini.

Eftir gomlu lógini var tað so, at sjófólk við heimarætti aðrastaðni enn í Føroyum, ella úr øðrum Norðurlandi, ikki kundu verða fevnd av sáttmála, sum tey føroysku fakfeløgini vóru partur av.

Tann nýggja orðingin er soleiðis, at ásetingin líkist lógini í norska altjóða skipaskránni (NIS) og hetta ger, at manningarfeløgini kunnu gera lønar- og setanarsáttmálar fyri útlendska manning við FAS skipum.

Fyrst í 2013 fingu vit fráboðan frá ITF umboðnum í Íslandi um skipið „Saga“, sum lág inni á Skálafjørðinum. Har vóru fleiri útlendingar umborð. Reiðaríið var farið á húsagang. Skipið var undir føroyskum flaggið.

FMU tók arrest í skipinum og setti garanti fyri teirri upphædd, sum reiðaríið skyldaði útlendsku manningini, og stutt eftir hetta fóru útlendingarnir heim.

Skipið bleiv selt á tvingsilssølu og FMU fekk síðan pengarnar aftur. Vit vóna at hetta og broytingin í FAS-lógini vil fáa tann týdning, at okkara samskifti við ITF blívur enn betri, so FAS-skip skjótari sleppa av listanum yvir skip undir hentleikaflaggi.

MLC sáttmálin er settur í gildi, so tað skuldi eisini hjálp uppá støðuna.

## Tryggingarfelagið LÍV

Sera striltið hevur gingist hjá fakfeløgunum við arbeiðinum fram ímóti einum keypið av Lív.

Tað blíva tvey ár nú 1. apríl 2014 síðan byrjað bleiv uppá hesa tilgongd. Tað ferð alla tíðina ein dialogur fram millum seljara og keypara, so vit flyta okkum alla tíðina nærri málinum.

Bygnaðurin í LÍV er broyttur síðan feløgini fóru undir tilgongdina fram í móti keypi.

## Samlagstryggingin

Við ársbyrjan 2013 broyttu Maskinmeistarafelagið og Skipara- og Navigatørfelagið umsitingina av samlagstrygging soleiðis, at fyri teir, sum hava eftirløn í LÍV, blívur tryggingargjaldið tikið av eftirlønarinngjaldinum.

Hettar hevur lætt ómetaliga nógv um arbeiðið á skrivstovuni og koyrir samlagstryggingin fyrimyndarliga í dag. Man skal kanska byrja at hugsa um at gera justeringar, tá avtalan við LÍV skal endurskoðast.

MF og FSN hava í dag umleið 620 limir inni í hesi skipan. Harumframt eru umleið 220, sum ikki hava eftirløn hjá LÍV, men sum sjálvir flyta eftirlønargjaldið.

## NMF

Síðsta heyst var NMF fundur í Reykjavík, hettar var kongress, t. v. s. at presidentur skuldi veljast. Maskinmeistarafelagið stóð fyri tørni til hendan postin, og tóku vit við uppgávuni.



*Atkvøðuseðlar verða taldir.*

Sekretariatið hjá NMF fylgir við formanninum og tí er skrivstovan hjá MF nú eisini sekretariat hjá NMF, og er skrivstovuleiðarin hjá felagnum eisini skrivari hjá NMF.

NMF umboðar umleið 30-túsund maskinmeistarar.

Í Reykjavík bleiv eisini undirskrivað ein sokallað „gensidighedsaftale“ millum feløgini, og samstundis bleiv ein avtala um málsetning viðtikin.

Næsti fundur verður nú í mai 2014 í Finnlandi.

## Útbúgving

Her kunnu vit fegnast um, at vit nú hava fingið eitt nýtt útbúgvingarráð fyri Vinnuskúlan. Fyrsti fundurin hevur verið og nokk av málum eru at tosa um, m. a. at menna maskinmeistaraútbúgvingina enn meira, og at fáa útbúgvingina til skip undir 3000 kW í eina fastari legu.

Fyri mær hevur tað sæð út sum, at líka síðan skúlarnir blivu samanlagdir, hava allar sparingar, sum eru farnar fram á skúlanum, gingið útyvir maskinistútbúgvingina. Tað kann ikki verða rætt at bremsa her, tá vinnan hevur brúk fyri maskinistum.

Aspirantskipan er eisini á listanum og her verður miðað eftir eini skjótari avgerð um at fáa ein fram eftir lítandi útbúgvingarpolitikk á maritima økinum og avkláring av, hvussu man kemur fram til eina bachelor útbúgving.

Hugsað verður eisini um at skapa betri umstøður til teir, sum lesa til maskinmeistarar, meira skeiðvirksemi til maskinmeistarar og betri samband millum Vinnuháskúlan og Fróðskaparsetrið soleiðis, at til ber at fara beinleiðis frá maskinmeistara til verkfrøði á setrinum, um tað er tað, man hevur hug til. Vit fegnast um, at nýggi stjórin hvørki er maskinmeistari ella navigatørur, og halda tað er tað einasta rætta framyvir fyri skúlan.

Vinnuháskúlin hevur í mong ár verið leiddur av stjóra og varastjóra, ið báðir hava verið navigatørar. Einki ringt um persónarnar, men vit hava til tíðir følt eitt manglandi forstáilsi fyri maskinmeistaraútbúgvingini. Tað kemst ikki uttanum, at stjórar altíð eru eitt sindur litaðir av útbúgvingarbakgrund og royndum.

Uttanveltaður stjóri við tveimum útbúgvingarleiðarum – ein til maskindeild og ein til navigatørdeild – og sum hava holla kunnleika til útbúgvingarnar, man verða tann skilabesti leisturin.

Í Danmark eru omanfyri 2.300, sum lesa til maskinmeistara í løtuni. Her hjá okkum ganga í løtuni 131 næmingar til maskinmeistara. Hóast tað í løtuni ikki er lýst við tilmelding til byrjan í august, so eru tað longu fleiri, sum hava søkt til maskinmeistara og eisini nakrir til maskinist.

## Mið og Magn

Blaðið er nú útkomið í 5 ár og tað hava verið ca. 70 blaðfundir hesi árini. Afturmeldingarnar hava verið positivar. Útkomudagurin hevur kanska varierað nakað, so eg trúgvi ikki, at rætti leisturin er funnin enn fyri blaðið.

Meiningin er, at fýra bløð skulu koma út í 2014, tvey bløð hvørt hálvárið.

Tankin um ein Mið og Magn portal er eitt sindur fjarur í løtuni.

## Maskinmeistarar uttan vinnubræv

Tað kann vera sera trupult at fáa fyrsta vinnubrævið hjá monnum, tá teir koma út frá skúlanum.

Við tí í huga sendi felagið í juni í fjør bræv til Sjóvinnustýrið, har vit boðaðu frá, at maskinmeistarar ella maskinistar, sum mangla siglingstíð, kunnu mynstra sum 2. meistarar við skipum undir 3000 kW, um ikki ber til at finna skikkaðar persónar. Í sáttmálanum fyri farmaskip er paragraf fyri maskinmeistarar uttan vinnubræv, og í nýggju lønartalvuni er hettar eisini komið at standa. Avtalað er eisini gjørd við P/F Hvalnes um persónar uttan vinnubræv við „Norðborg" og „Christian í Grótinum" og vónandi fáa vit eisini avtalu við Føroya Reiðarafelag.

Vit hava roynt at fáa eina avtalu við SSL um at fáa tveir umborð á Smyril, men tað gongst sera striltið. Vit hava eisini roynt hjá Vørn, og har gongst tað uppaftur verri, so tað sær ikki út sum landsmyndugleikarnir eru serliga positivir yvir fyri einari slíkari skipan.

## Sjóvinnustýrið

Man kann til tíðir ivast í málsviðgerðini hjá hesum stýri. Vit hava dømi um, at undantaksloyvi er givið til útlending, meðan tað verður kannað hvørja útbúgving og vinnubrøv viðkomandi hevur. Ongin kunning er t.d. givin um royndir ella um søkt hevur verið eftir skikkaðum maskinmeistara. Her fylgir Sjóvinnustýrið ikki vanligari siðvenju og heldur ikki sínari egnu reglugerð.

Tað kann tykjast sum um Sjóvinnustýrið til tíðir leggur størri dent á at fáa skip mannað enn at hugsa um trygdina umborð, sum skuldi verið teirra høvuðsendamál.

Við árskifti boðaði landsstýrismaðurin John Dahl frá, at stjórin í Sjóvinnustýrinum varð settur fyribilsstjóri á SSL. Hettar var ein sera óheppin setan, tí báðir skuldu vita betur.

Tað er eisini skeivt, at landsstýrismaðurin bæði hevur „reiðarakasjett" og samstundis hevur Sjóvinnustýrið undir sær. SSL og Sjóvinnustýrið hoyra ikki heima hjá sama landsstýrismanni, og tað hevur eisini verið atskilt áður.

Álitið á Sjóvinnustýrið viknar við slíkum avgerðum.

## Fasti Gerðarrættur

Vit hava eitt mál koyrandi í Fasta gerðarrættinum í løtuni. Tað snýr seg um telefonvakt hjá Arbeiðseftirlitinum. Hetta málið hevur verið sera drúgt. Eg meini tað ferð at nærkast hálvumøðrum árið, síðan málið bleiv lagt fyri Fasta gerðarrætti.

## At enda

Maskinmeistarafelagið er av teirri meining, at framtíðin fyri maskinmeistarar sær góð út, men flestu góðu arbeiðstilboðini eru uttanlands.

Frá okkara starvsfeløgunum innan NMF fáa vit at vita, at tað er nærum ongin arbeiðsleysur maskinmeistari hjá teimum, og prognosurnar vísa ein vaksandi tørv, serliga innan offshore økið og grøna orku.



# Umrøða av formansfrágreiðingini



Sjúrður Heinesen var fundarstjóri á aðalfundinum.

Tað vóru ikki nógvar viðmerkingar til formansfrágreiðingina. Spurt varð, hvat tann sokallaða „gensidighedsavtalan" í NMF umfatar og upplýst varð, at avtalan ásetir, at maskinmeistarar kunnu velja, hvar teir eru limir, t. d. kunnu føroyingar við norskum skipum velja, um teir eru í føroyska ella norska felagnum.

Mælt varð til at senda avtaluna út sum tíðindaskriv.

Spurt varð, um talan er um felags sáttmálar millum norðanlond og svarað varð, at so er ikki. Sáttmálarnir líkjast, men skattaviðurskiftini eru ymisk. Í Noreg t. d. verða 28 % goldin í skatti og í Føroyum 35 %. Um skattaprosentið var tað sama, hevði ikki verið stórvegis munur.

Spurt varð hvussu gongur við bachelor útbúgving hjá maskinmeistarum og formaðurin greiddi frá, at ymiskir holdningar hava verið til hetta seinastu árini við skiftandi stjórum á Vinnuháskúlanum. Hann upplýsti, at nú er Útbúgvingarráðið farið til verka aftur og væntandi fer tað at skunda undir at fáa útbúgvingina upp á bachelorstøði.

Tá fleiri viðmerkingar ikki vóru til formansfrágreiðingina, staðfesti Sjúrður Heinesen, ið var valdur til fundarstjóra, nú, at formansfrágreiðingin var tikin til eftirtektar.

## Limagjald broytt

Nevndin hevði uppskot um at broyta limagjaldið hjá limum sum sigla við grønlendskum skipum soleiðis, at hesir nú koma at gjalda tað sama sum aðrir í limagjaldi, tað vil siga 1,2% av lønini. Higartil hava teir goldið eitt fast gjald, sum er 300 kr., men av tí at tað fleiri ferðir er komið fyri, at felagið hevur brúkt fitt av pengum uppá at hjálpt júst hesum limunum, sum eru komnir í trupulleikar av einum hvørjum slagi, so var eisini mett rímiligt, at teir gjalda tað sama sum aðrir í limagjaldi. Útreiðslurnar hava higartil ikki staðið í mát við inntøkurnar av hesum limunum, segði nevndin, sum heitti á limirnar um at taka undir við uppskotinum, sum eisini varð samtykt við stórum meiriluta.

## Lógarbroytingar

Fundarstjórin upplýsti, at uppskot er komið frá Jákupi Jacobsen. Uppskotið varð lisið upp og er tað soljóðandi:

*§ 13 verður broytt soleiðis, at undir stk. 7 kemur at standa:*

Aðalfundurin er viðtøkuførur, tá minst 10 limir eru møttir á fundi.

Er aðalfundurin ikki viðtøkuførur verður lýst til eykaaðalfund eftir somu mannagongd sum í § 13 stk. 5

Formaðurin segði, at tíverri var uppskotsstillarin ikki til staðar, so hann kundi greiða nærri frá uppskotinum. Formaðurin upplýsti, at nevndin hevði ikki nakra avgjørda felags støðu til málið.

Tað vóru onkrar viðmerkingar til uppskotið – bæði fyri og ímóti.

Nevnt varð, at uppskotið kundi leggjast fyri aftur. Fundarstjórin segði, at tað kann leggjast fram aftur á komandi aðalfundi, men formelt má hesin aðalfundurin taka støðu til uppskotið.

Hann bað síðani um, at atkvøtt varð um uppskotið og úrslitið varð, at 4 atkvøddu fyri, meðan ein stórur meiriluti atkvøddi í móti.

Sostatt varð staðfest, at hetta uppskotið var fallið.

*Val av formanni, nevndarlimum og tiltakslimum*

*Væl av formanni er sambært lógini 3. hvørt ár. Sitandi formaður varð valdur í 2012 og sostatt var formansval ikki á skránni í ár.*

Síðani varð farið undir val av nevndarlimum. Fyri vali stóðu Jóan Petur Patursson og John Højsted og teir høvdu báðir longu áðrenn 15.



desember 2013 boðað frá, at teir tóku við afturvali.

Upplýst varð síðani, at tað bar til at seta fram fleiri uppskot til nevndarvalið á aðalfundinum og Sam Vang varð skotin upp til nevndina.

Jóan Petur og John fingu síðani høvi til eina stutta presentatión. Sam Vang var ikki staddur á aðalfundinum, men hevði játtað at stilla upp.

Síðani varð farið undir atkvøðugreiðsluna og úrslitið varð hetta:

| | |
|---|---|
| *John Højsted:* | *34 atkvøður* |
| *Jóan Petur Patursson:* | *28 atkvøður* |
| *Sam Vang:* | *14 atkvøður* |

Sostatt vóru John Højsted og Jóan Petur Patursson afturvaldir til nevndarlimir.

John og Jóan Petur tóku orðið og takkaðu fyri, at teir vóru valdir aftur.

Viðmerkjast skal, at í sambandi við nevndarval vóru 7 brævatkvøður komnar.

## Tiltakslimir

Síðani varð skipað fyri vali av tiltakslimum og heitt varð á limirnar um at koma við uppskotum.

Skotið varð upp at velja Sam Vang og Petur Skeel Dahl.

Petur Skeel Dahl presenteraði seg stutt. Síðani varð atkvøtt og úrslitið var hetta:

| | |
|---|---|
| *Petur Skeel Dahl:* | *22 atkvøður* |
| *Sam Vang:* | *14 atkvøður* |

Sostatt varð Petur Skeel Dahl valdur sum 1. tiltakslimur og Sam Vang sum 2. tiltakslimur.

## Val av grannskoðara

Sambært lógini skal grannskoðari veljast 2. hvørt ár. Fundarstjórin upplýsti, at grannskoðarafelagið SPEKT hevur verið grannskoðari felagsins gjøgnum nógv ár og mælti til, at teir halda fram.

Hetta varð samtykt.

## Seinasta málið á skránni var Ymiskt

Í hesum sambandi varð spurt um bachelor skipanina og hvørja ávirkan Maskinmeistarafelagið hevði á at fáa hana í lag. Formaðurin vísti á, at Útbúgvingarráðið hevur ein leiklut og her kann felagið gera sína ávirkan galdandi.

Nakað av orðaskifti var annars um hetta og semja var m. a. um, at rættast er, at hava somu skipan, sum í Danmark, sum á hesum øki verður mett at liggja á hægsta støði í norðurlondum.

Ein limur, sum hevði tikið professiónsbachelor í Danmark greiddi eitt sindur frá teirri skipanini og nevndi m. a., at man kundi velja seg inn á ymsar greinar og at seinasta hálvárið var so eitt bachelorprojekt gjørt.

Onkur helt, at ásetigar í SEV-sáttmálanum viðvíkjandi avspáking vóru ógreiðar.

John Højsted segði, at hann helt, at talan er um avspáking eftir kl. 15.

Formaðurin helt, at felagið má hava ein dialog við mótpartin um hetta. Onkur helt, at felagið skrivaði undir og fór síðani at finna út av, hvat tað merkti. Viðkomandi spurdi, hvat sakførarin segði og formaðurin svaraði, at hann var ikki spurdur um hetta.

Næstformaðurin segði seg illa skilja, at tað var blivið til ein trupulleika, at kvøldvaktin byrjaði kl. 15.

Spurt varð eisini um málið viðvíkjandi maskinmeistarum hjá SEV við eltekniskum førleika og formaðurin svaraði, at hetta var ikki nakað, sum felagið hevði funnið upp á, og at her er annars bert talan um tveir ávísar persónar.

Ein limur spurdi, hví ikki allir limir kunnu velja við brævatkvøðu eins og gjørt verður í fleiri øðrum feløgum. Upplýst varð, at til hetta krevst lógarbroyting.

Nakað av orðaskifti var um hetta og víst varð m. a. á, at tá ið talan er um formansval, sum verður komandi ár, ber til at velja við brævatkvøðu á skrivstovuni frá 15. desember í 2014.

Uml. kl. 18 gav fundarleiðarin formanninum orðið til at enda fundin.

Formaðurin takkaði fyri góðan aðalfund, og so var fundurin slitin.



Vinstrumegin, Regin Olsen, næstformaður í Maskinmeistarafelagnum og Páll Hansen formaður felagsins.



# Bachelorútbúgving

Á aðalfundinum vóru fleiri, sum mettu, at maskinmeistaraútbúgvingin átti at verið uppstigað til bachelor stig.



Petur Skeel Dahl

Ein teirra var Petur Skeel Dahl, sum á aðalfundinum eisini varð nývaldur tiltakslimur til nevndina í felagnum.

Petur Skeel Dahl vísti á, at møguleikarnir fyri víðarilestri eru munin betri, um útbúgvingin er uppstigað til Bachelor stig.

Páll Hansen greiddi frá, at ein partur av trupulleikanum hevur verið, at Útbúgvingarráðið hevur virkað illa, men nú er ljós fyri stavn í so máta. Hann nevndi eisini, at tá Helena Dam á Neystabø var mentamálaráðharri bleiv arbeitt við málinum, men alt arbeiði steðgaði upp, tá Bjørn Kalsø setti seg í sessin í mentamálaráðnum. Men nú vit hava fingið nýggjan stjóra í Vinnuháskúlanum, fer helst okkurt at henda.

## Nógv meira spennandi

Sambært Petur Skeel Dahl hevði tað eisini gjørt maskinmeistaraútbúgvingina nógv meira spennandi, um teir lesandi vistu, at teir gjørdust bachelorar, tá teir vóru lidnir.

– Útbúgvingin er í dag merkt av uttanatlæru og terping og tað skal eisini til, slett ikki tað. Men eitt nú tá tú skrivar høvuðsuppgávu ella spesiali á bachelorstigi, so tekur tú støði í eini meiri ítøkiligari verkætlan, sum er meira vinnurelaterað enn í dag, sigur Petur Skeel Dahl. Hann ivast ikki í, at tað hevði styrkt sambandið millum tey lesandi og vinnulívið, at útbúgvingin bleiv uppstigað.

– Og so hevði tað eisini verið meiri í tráð við tíðarandan, nú vit tosa so nógv um íverksetan, sigur Petur Skeel Dahl.

## Illvilji

Ein ávísur illvilji er viðhvørt at hóma millum summar maskinmeistarar, sum kanska ikki halda at akademikarar hava nakað at gera í einum maskinrúmi. Men til tað er at siga, at tað eru fleiri sløg av bachelorum, og maskinmeistarar høvdu, eins og eitt nú sjúkrarøktarfrøðingar, blivið til proffessiónsbachelorar. Tað vil siga, at teir eru ikki akademikarar, tí teir hava ikki beinleiðis lisið á lærdum háskúla, og eisini er útbúgvingin merkt av nógvari praktiskari venjing.

## Virðing fyri øllum sjónarmiðum

– Tað er ikki óvanligt innan flest allar útbúgvingar, at tú kanst tosa um tann gamla og tann nýggja skúlan. Og eg haldi, at vit skulu hava virðing fyri øllum sjónarmiðum. Men vit noyðast at fylgja við tíðini, um okkum so dámar tað ella ikki, sigur Petur Skeel Dahl við Mið & Magn.

Hann vísir í saman viðfangi á, at meir kundi verið gjørt við maskinistútbúgvingina, so hon kanska bleiv meiri orienterað móti tí maritima, samstundis sum siðbundna maskinmeistaraútbúgvingin blívur alt meiri orienterað móti tí bókliga.

Á aðalfundinum var ein limur, sum hevur lisið uttanlands, og sum tí er bachelorur. Hann greiddi frá, at sum hann sá tað, so var størsti munurin, at tú á bachelorútbúgvingini velur eina grein, til dømis kølteknikk ella tað maritima, og síðani skrivar serritgerð ella spesiali um hesa greinina. Meðan í Føroyum er útbúgvingin øll sum hon er rættuliga nógv orienterað móti einum arbeiði á sjónum.

# Fyrstu royndirnar at reka skipsfiskiskap

Fyrstu royndirnar hjá føroyingum at reka skipsfiskiskap royndust væl. Byrjað varð í smáum undir Føroyum og undir Íslandi í 1870-árunum. Tað var serliga fiskiskapurin undir Íslandi, sum vaks ár undan ári á Eysturlandinum. Fyrstu árini vóru skipini til fiskiskap undir Føroyum við snøri um várið, og um summarið og út á heysti – undir Íslandi – á línuveiðu við bátum.

Vit hava ikki nógvar føroyskar keldur, sum siga frá, hvussu skipsfiskiskapurin tók seg upp. Men í íslendskum søguatlassi verður sagt, at føroyska toskaveiðan var atvoldin til umfatandi vinnulívsbroytingar á Eysturlandinum og eisini í Vestmannaoyggjunum. Íslendingar keyptu bátar frá føroyingum, og tóku tey tøkniligu framstig, sum føroyingar høvdu við sær, til sín.



Delfinen var ein av fyrstu havgangandi nýbygningunum, sum føroyingar lótu byggja.

## Ikki allir tóku væl ímóti føroyingum

Men tað vóru ikki allir íslendingar, sum tóku væl ímóti føroyingum. Í brævi, sum sent varð Altinginum, undirskrivað 12. mars 1875, verður m.a. sagt frá upprunanum til føroyska fiskiskapin undir Íslandi. Í hesum brævi verður greitt frá, at føroyskt skip var statt á Seydisfirði heystið 1871. Føroyingar høvdu um summarið róð út frá hesum skipi á tey vanligu miðini, sum seyðfirðingar eru vanir at royna á. Árið eftir, 1872, komu tvey fiskiskip úr Føroyum, væl útgjørd á allan hátt, bæði við manning og fiskireiðskapi. Tey løgdu seg í legu við Hánefsstaðaeyri. Um heystið fóru skipini heim við stórari veiði uttan at hava rindað eitt oyra hvørki til sjúkrahús, fátækragrunn ella naka annað. Her eigur at vera nevnt, at hesi gjøld guldu íslendskir fiskimenn.

Og í brævinum verður hildið soleiðis fram: Í 1873 komu føroyingar aftur við 4 skipum á Seydisfjørð og samstundis við einum skipi á Norðfjørðin. Á Seydisfirði løgdu teir seg í sama stað, sum teir høvdu ligið áður, og róðu støðugt út við tveimum bátum frá hvørjum skipi. Ofta stóðu línur teirra nátt og dag, men veiðina fluttu teir umborð á skipini og saltaðu hana har. Um heystið fóru teir sum vant heim, men søgdu, áðrenn teir fóru, at næsta ár komu teir enn fjølmentari aftur.

Í 1874 komu teir við 5 skipum á Seydisfjørð, og fiskiskapurin fór fram eins og undanfarnu ár. Og eins og árini frammanundan rindaðu teir heldur ikki hetta árið landinum nakað.

## Ósemjan við íslendingar

Frá føroyskum keldum vita vit, at í 1881 vóru 21 føroysk skip til fiskiskap undir Íslandi; miðalstøddin á hesum skipum var um 45,6 br. Reg. Tons.

Løgtingið viðgjørdi ósemjuna við íslendingar í tingsetuni 1879 og sendi danska løgmálaráðnum tilmæli ikki at læta íslendingar forða føroyingum at fiska undir Íslandi. Løgtingið sipaði til, at fiskiskapurin undir Føroyum hevði verið so lakur tey seinastu árini. Av tí at nógv fremmand skip høvdu roynt undir Føroyum, vóru føroyingar noyddir til at royna nýggjar leiðir.

Løgmálaráðið svaraði føroyingum, at íslendskar fiskuveiðusamtyktir kundu ikki áseta annan rætt fyri føroyingar, enn fyri íslendingar sjálvar; at aðrir danskir ríkisborgarar vórðu noyddir at lýða samtyktir, sum íslendingar eisini settu sær sjálvum.

## Føroyingar læra íslendingar at fiska

Jógvan Simonsen í Hoyvík, skipari, og ein av høvuðspartaeigarunum í nýbygda skipinum Delfinen í Havn frá 1880, skrivar grein í Dimmalætting í desember 1882. Hann endar grein sína soleiðis: Í staðin fyri at hava verið ein meinbogi hjá íslendingum í teirra fiskiskapi á firðunum, hava vit hjálpt teimum munandi. Spyr bara ein keypmann ella einhvønn annan, sum veit um viðurskiftini. Tá hevði komið fram, at nógvur fiskur verður nú virkaður og útfluttur av Norðfjørðinum aftur ímóti áður, tá einki varð útflutt. Íslendingar kunnu takka frændunum føroyingum fyri henda útflutning og fyri, at teir hava lært íslendingar at fiska.

Um somu tíð, sum føroyskur sluppfiskiskapur tók seg upp undir Íslandi, fóru føroyingar undir nýggja vinnu til lands, t.e. at rógva út á Eysturlandinum í Íslandi, har nógvur fiskur var at veiða, og fingu nógvastaðni gjørt sær umstøður at virka fisk. Umframt stóru manningarnar á skipunum, vóru onkur ár, t.d. í 1890, slakir 1000 føroyingar, útróðrarmenn og fiskagentur til lands undir Íslandi.

## Kreppan í 1880-árunum

Fyrst í 1880-árunum helt fiskiskapurin fram á sama hátt sum undanfarin ár. Fyrst undir Føroyum um várið við snøri og síðan um summarið og út á heystið til Íslands á línuveiðu við bátum.

Men í 1879 og aftur í 1880 fellur ráfiskaprísurin.

## „Í lýsing"

Seinni fellur ráfiskaprísurin uppaftur longur niður.

Hetta saman við miseydnaðum fiskiskapi undir Íslandi gjørdi, at seinna helvt av 1880 árunum vóru kreppuár í Føroyum. Serliga illa stóð til í 1887. Veturin 1886-87 hevði verið ringur við seyðasjúkum og stórum seyðafelli. Fiskiskapurin var vánaligur, og summarið royndist illa. Støðan bara versnaði, og ótti var fyri hungursneyð. Sjálvt kongsbøndur vóru í neyð, fleiri teirra megnaðu ikki at gjalda jarðarleigu og kommunuskatt.

Afturgongdin sæst m.a. í tí, at fiskiskipatalið fellur úr 26 skipum í 1883 niður í 15 skip í 1887 og niður í 14 skip í 1890.

## Rock All

Fiskaloysið fekk føroyingar at royna nýggjar leiðir. Í 1887 fara 7 føroysk skip at gera fiskiroyndir við Rock All, og tey fingu væl av fiski. Fyrsta føroyska skipið, sum royndi við Rokkin var Delfinen, við Poul Nikláa Danielsen í Nólsoy sum skipara. Hann hevur greitt soleiðis frá fiskiskapinum:

Várið 1887 royndu vit sum vant undir Føroyum, men ógvuliga striltið gekk, tær fyrstu 5 vikurnar fingu vit bara 500 fiskar. Frá Hetlendingum fréttu vit um nógvan fisk við Rokkin, og so varð avgjørt at fara hagar. 26. apríl kastaðu vit fyrstu ferð og fiskurin treyt ikki, men veðurlagið dugdi onki. Ein mánað lógu vit har, men høvdu bara 18 fiskidagar; kortini fingu vit – 14 vóru menninir – 18.000 av stórum toski og vigaðu teir 350 skpd. Tríggir vóru túrarnir til Rokkin hetta árið og fingu vit 850 skpd. til samans, so tað eydnaðist bara væl.



Í 1887 fór fyrsta føroyska skipið, Delfinen, at royna fiskiskap við Rokkin, Rock All.

# Petur Skeel Dahl



***Føddur 3. januar 1976***

**Børn:**
Saman við konu mínari Mariu Dahl eiga vit, Petur 16 ár, Oddvør 10 ár og Anitu 6 ár.

**Starv:**
Maskinmeistari umborð á Olympic Intervention IV, ið er eitt „Subsea“ skip.

Skipið sum er chartrað av Oceaneering, hevur 150 T krana, tveir ROV og kan arbeiða á 3000 m dýpi.

Vit gera ymisk arbeiði í samband við oljuvinnuna, út frá Port Fourchon í Louisiana.

**Útbúgving:**
Eftir 10 flokk, fór eg i læru hjá P/F Demich sum rør- og blikksmiður.

Síðan fór eg á Føroya maskinmeistaraskúla, har bleiv eg maskinmeistari í 2001.

**Hvussu eru útlitini hjá Maskinmeistarunum?**
Ì løtuni eru útlitini stak góð.

Tað eru nógv arbeiði í grannalondunum, har eru vit Føroyingar væl dámdir.

Eisini eru góðir møguleikar at fáa starv heima í Føroyum.

**Hvat er størsta avbjóðingin hjá einum maskinmeistara í dag?**
Í oljuvinnuni eru krøvini stór viðvíkjandi heilsu, umhvørvið, trygd og góðsku.

Hetta førir við sær, at tað eru nógv ar reglur og mannagongdir ið vit skulu fylgja, sum vit ikki kenna frá einum føroyskum arbeiðsplássi.

Nærum øll arbeiði umborð krevja eina skrivliga váðalýsing

Somuleiðis skulu skrivligar mannagongdir gerast, til tey flestu arbeiðini umborð.

Váðalýsingarnar og mannagongdirnar skulu gjøgnumgangast og undirskrivast, áðrenn byrjað verður.

Fyri nógvar maskinmeistarar kunnu hesi „papír arbeiðini“ vera í so møtimikil.

**Fyrstu ferð til skips:**
Var í 10 floks starvsvenjing við Polarhav.

Hetta var í desember 1991.

Minnist afturá hvussu ringt veðri var hesar túrararnar.

**Hvørjum skipum hevur tú verið við:**
Meðan eg gekk á maskinskúla, var eg avloysari hjá SSL. Eg var fyri tað mesta við Ternuni um Vestmannasund, var eisini onkran túrin við Smyrli.

Liðugur við maskinskúlan fór eg við Sólborg til eystur Grønlands og Flemish kap

Eisini var eg ein túr við Grønlendska krabbaskipinum Aqisaq.

Í 2007 byrjaði eg hjá Olympic Shipping. Eg havi veri við Olympic Progress, Olympic Electra og í tveimun umførum við Olympic Intervention IV.

**Longsti túrur til skips:**
Var 3 mánaðir í Grønlandi við krabbaskipi.

**Frítíðarítriv:**
Mest av frítíðini fer saman við børnunum, konuni, familjuni og vinunum.

Ítróttin fyllir tó nógv. Øll børnini spæla okkurt. Leygardagarnir fara at fylgja við teimum.

Somuleiðis royni at síggja so nógvar dystir hjá ávikavist H71, Liverpool og HB, sum møguligt.

Eisini eigi eg eina súkklu, sum eg royni at brúka eitt sindur.

Og so eru nøkur projekt (alt ov nógv) í gongd rundan um húsini.

**Bilur:**
Ein gráður Mitsubishi Outlander

**Telda:**
Eigi onga teldu. Umborð havi eg arbeiðstelduna. Heima klári eg meg við telefonini ella láni eg telduna frá onkrum av hinum í húsinum.

**Besta bók:**
Eg havi altíð lisið meðan eg eri burtur.

Seinasta summar keypti eg mær ein „Kindle“

Eitt hent tól sum gerð tað lætt at fá hendir á og lesa ymiskar góðar útlendskar bókur.

Í seinastuni havi eg lisið fleiri hjá Ken Follett. Ein fínur rithøvundur.

Men tann besta er nokk „Jeder stirbt für sich allein“ ella donskum “Alene i Berlin” sum Hans Fallada hevur skrivað.

**Besti sangur:**
Trupult at taka dagar ímillum teir mongu sangirnar.

Einaferð í seinu helvt av nítiárunum vóru tónleikarar frá The Commitments í Føroyum og spældu í norðurlandahúsinum. Hetta var ein ótrúliga góð konsert.

Mær dámar væl teirra tulking av sanginum „Mustang Sally“

**Hvat kann gleða teg í gerandisdegnum:**
Sum útgangsstøði eri eg glaður og vælnøgdur

Mær dámar væl at vera saman við familjuni, vinunum og góðum starvsfeløgum.

**Hvat kann øsa teg í dagligdegnum:**
Vit duga ov illa at skipað hetta lítla samfelagið. Vit hava alt ov nógvar almennar stovnar sum bert eru til fyri starvsfólkini.

Tey 3 sjúkrahúsini eru tað ringasta dømi.

Somuleiðis kann eg øsa meg inná politikararnar í Tórshavnar Býráð. Har hendir hvørki eitt ella annað, samstundis sum kommunan er ófatiliga dýr at reka.

**Um skiparan og maskinmeistaran**
Ein góður skipari hevur altíð nýkókað kaffi, tá maskinmeistarin kemur á brúnna.




↘ betri.fo



VIÐGERÐARTRYGGING

Slepp undan
**bíðilistum**

FÁ VIÐGERÐ INNAN 10 ARBEIÐSDAGAR

**Viðgerðartrygging er trygging, sum tryggjar tær eina skjóta og góða viðgerð, um tú gerst sjúk/ur ella ert fyri vanlukku.**

**Við hesi trygging verður tú effektivt og trygt leidd/ur gjøgnum sjúkravgerð, skurðviðgerð og eftirviðgerð.**

Mølholm Forsikring A/S tekur sær av at fáa tær eina tíð á privatsjúkrahúsi ella privatum viðgerðarstovni, sum hevur serkunnleika. Allar vanligar útreiðslur hjá góðkendum viðgerðarstovnum í Føroyum, Danmark, Skandinavia og Týsklandi eru umfataðar í hesi trygging. Tú kanst velja at víðka tryggingina til eisini at umfata flogferðaseðil millum Føroyar og Danmark aftur og fram.

**Vend tær til okkum á telefon 345700 ella betri@betri.fo og hoyr meira um okkara Viðgerðartrygging.**





TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Betri pensjón



# Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum:

**26-02-2014 Kaffihúsið**
Annar fundur við sjófólki hjá Team Beredskab. Á hesum fundinum varð tosað um møtast fast eina ferð árliga og var semja um hettar.

**04-03-2014 Tor Shipping**
Fundur á skrivstovuni hjá Tor shipping um eftirlønarviðurskifti hjá manningunum umborð á skipinum hjá Team Beredskab, semja var um, at eftirlønar % skal verða eins hjá øllum í seinasta lagið 28-02-2015.

**07-03-2014 SEV**
60+ dagur fyri starvsfólkum hjá SEV í skrivstovubygninginum, sera væleydnaður dagur har greitt bleiv frá eftirlønarviðurskiftum bæði av umboðið frá Almannastovuni og fakfeløgum. Lækni, sálarfrøðingur og umboð frá tilhaldi vóru eisini og greiddu frá. Umfram tveir eftirlønarmóttakarar, sum greiddu frá teirra gerandisdegi, og endað varð við steppdansi.

**11-03-2014 Advokatskrivstovan**
Fundur við umboð fyri Realin, um sjópantikrøv hjá trolaranum Edna.

**13-03-2014 Nevndarfundur**
6 mál vóru á skránni, m.a. val av næstformanni og býti av málsøkjum millum nevndarlimirnar, og sáttmáli við Polar Seafood.

Seinnapartin: ALS–Húsið. Stýrisfundur í trygdargrunninum. 8 mál vóru til fundin, m.a. broytingar í kunngerð og áseting av inntøkutrygd, íløgustrategi og støðutakan til nýggja kt-skipan.

**14-03-2014 Vinnuhúsið**
Fundur millum Føroya Reiðarafelag og manningarfeløgini um endurskoðan av felagsreglunum fyri fiskiskip.

**18-03-2014 Vinnunevndin**
Manningarfeløgini møttu á fundi hjá vinnunevndini um uppskotið hjá Javnaðarflokkinum. Manningarfeløgini greiddu frá sínum sjónarmiðum, og kjakast varð eina løtu um uppskotið.

Seinnapartin: Fundur við KAF um tulkingartrupulleika í SEV/IRF sáttmálanum, semja var um at gjøgnumganga útrokningarnar einaferð enn.

**19-03-2014 S&K**
Sp/pf Fakfelag hevði nevndarfund saman við sínum ráðgevum um keypsavtalu við LÍV.

**21-03-2014 MF**
Fundur millum SSL og MF har arbeiðsætlanir blivu framlagdar fyri Smyril og Teistan. Hesar skulu viðgerast á fyrst komandi nevndarfundi.

**28-03-2014 MF**
Fyrrapartin: Fundur við álitisumboð frá SEV og IRF. Fleiri aktuell mál vóru viðgjørd m.a. hvørjar eru uppgávurnar hjá álitisfólki. Sáttmálasamráðingar, verkfalsrættur og eftirlønarviðurskifti.

Seinnapartin: Nevndarfundur um arbeiðsætlanir hjá SSL vóru á skránni, men støðan var, at SSL ikki heldur semjuna frá Skálavík, sum er ein fortreyt fyri at koma víðari.

**01-04-2014 Advokatfelagið**
Fundur við advokat hjá trotabúnum Faroe Seafood, um útgjald til limir hjá felagnum.

**04-04-2014 Vinnuhúsið**
Fundur millum Føroya Reiðarafelag og manningarfeløgini, um endurskoðan av felagsreglunum fyri fiskiskip.

**07-04-2014 FF**
Fundur millum umboð fyri politiið og manningarfeløgini um útlendingar við føroyskum fiskiskipum.

**14-04-2014 Maritima**
Útbúgvingarráðið. Eini 10 mál vóru á skránni, kunnað varð sera gjølla frá, hvussu aspirantskipanin í Svendborg varð skipað. Tosað bleiv um hesa skipanina, og hvussu hon kann passast inn í verandi modulskipan á Vinnuháskúlanum. Eisini bleiv tosað um dugnaskaparskeið í sigling og dugnaskaparskeið í motorpassing.

**15-04-2014 Nevndarfundur**
5 mál vóru til kunning og 5 til støðutakan. Kunnað bleiv millum annað um LÍV keypið, Grunnabarð og vitjan av Udlændingestyrelsen. Eisini bleiv kunnað um støðuna í stk. 5 í SEV sáttmálanum.

Støðutakan: Tosað varð um komandi samráðingar við FAG og farmaskip undir 300KW. Eisini bleiv støða tikin til skipsatstøðingar.

**15-04-2014 ALS-húsið.**
Fundur í stýrinum fyri grunnin. Seks mál vóru á skránni, m.a. ásetan av minstulønn. Semja var um at áseta minstulønina til kr. 925 um dagin.

**24-04-2014 Vinnuhúsið**
Triði fundur millum Føroya Reiðarafelag og manningarfeløgini, um endurskoðan av felagsreglunum fyri fiskiskip.

**29-04-2014 FF**
Fundur við umboð fyri JFK og Føroya Reiðarafelag fyri Fiskiskip um møguleikarnar fyri fastløntaravtalu fyri øll skipini hjá JFK. Partarnir samdust um at taka hetta upp í framtíðini.

**02-05-2014 Sjóvinnustýrið Fyrrapart:**
Á fundinum vóru umboð fyri Vinnuháskúlan, MF, FSN og Mentamálaráði saman við umboðum frá Sjóvinnustýrinum. Sjóvinnustýrið arbeiðir við nýggjum talvum til ásetan av krøvum til yvirmenn. Fyri okkara viðkomandi serliga frá 100-749 kW. MF boðaði frá, at man má kenna innihaldið í útbúgvingini áðrenn man góðtekur.

Seinnapart: FSN blaðfundur Mið & Magn, samla greinar saman til komandi blað.

**05-05-2014 NMF**
Fundir í Helsingfors Fundurin bleiv hildin á skrivstovuni hjá finska felagnum. Umboð fyri øll limafeløgini vóru møtt. Á skránni vóru 10 mál. Fyrst løddu limafeløgini sínar landrapportir fram, høvi var eisini til at seta spurningar. Harumframt bleiv tosað um internationalt samstarv í ITF, IMO v.m.

Kjakast var um ratificering av MLC 2006, serliga kravið um el-tekniska vitan, sum kemur í gildi 1. januar 2017. Her verður neyðugt at fylgja nógv betur við enn vit higartil hava gjørt, og eisini fáa vitan um, hvussu Vinnuháskúlin ferð at loysa tey nýggju krøvini.

**15-05-2014 Nevndarfundur**
Fýra mál vóru til kunning, støðan í LÍV keypinum varð umrødd, fundur vesturi í Vágunum um m.a. endurskoðan av manningarlógini.

9 mál vóru til støðutakan m.a. upplegg til sáttmála við FAG. Sáttmála fyri farmaskip undir 300KW og fáa samband við GA um endurnýggjan av høvuðsavtalu.

**19-05-2014 Starvsmannafelagið**
Fundur millum Sp/f Fakfelag og ráðgeva um støðuna í LÍV, nú fortreytirnar eru broyttar nakað. Semja var um at taka ein beinleiðis fund við landsstýrismannin í málinum.

**22-23/05-2014 FAG-MF**
Hesar báðar dagarnar vóru sáttmálasamráðingar millum MF og FAG. Partarnir løddu síni krøv fram tann fyrra dagin. Tosað bleiv nakað um krøvini og fráboðanarfreist, eftirløn og fastar frídagar. Komið bleiv til eina semju seinna dagin, sum fylgir tí karmi, sum onnur feløg høvdu avtalað.

**27-05-2014 Maritima Útbúgvingarráðið**
Eini 10 mál vóru á skráni: Kunna bleiv sera gjølla frá, hvussu aspirantskipanin í Svendborg varð skipað, tosað bleiv um hesa skipan, og hvussu hon kann passast inn í verandi modulskipan á skúlanum. Eisini bleiv tosað um dugnaskaparskeið í sigling og dugnaskaparskeið í motorpassing.

**30-05-2014 MF**
Sáttmálasamráðingar við farmaskip undir 3000KW, partarnir gjøgnumgingu sáttmálan og krøvini hjá hvørjum øðrum. Ein sera góður fundur.

**05-06-2014 MF**
Annar samráðingarfundur við smærri farmaskip. Fundurin endaði við, at sáttmáli bleiv undirskrivaður millum partarnar, smávegis broytingar eru í sáttmálanum og lønarhækkingin er tann sama sum sáttmáli við Føroya Reiðarafelag fyri farmaskip. Feløgini sum hesin sáttmálin umfatar eru Sand & Frakt, Sandgrevstur, Sekstant og NA Transport, í alt 14 skip.

**12-06-2014 MF**
Innanhýsis fundir millum manningarfeløgini um at fyrireika seg til fund við udlændingestyrelsen.



*Fundur í Helsingfors 5.-6. Mai 2014: Frá vinstu: Leif Wikstrøm, Gustav Schmidt Hansen, Odd Rune Malterud, Páll Hansen, Gudmundur Ragnarsson, Halldor A. Gudmundsson og Mikael Huss.*

## Dugnaskapsútbúgving í motorpassing

Arbeitt verður við broytingum í manningarlógini í løtuni. Meiningin er, at dugnaskaparroynd í motorpassing skal vera frá 100 til 749 KW. Maskinmeistarafelagið kann taka undir við hesum treyta av, at dugnaskaparroyndin eisini verður dagførd soleiðis, at hon er í tráð við tann føroyska veruleikan. Vit halda ikki, at tann danski leisturin kann brúkast her. Eisini eru vit av teirri áskoðan, at hetta er ein útbúgving til vinnurekandi- og havgangandi skip á fjarleiðum. Tí er tað natúrligt, at útbúgvingin verður boðin fram á Vinnuháskúlanum sum skeið. Mangul er í vinnuni eftir hesum monnum. Nú er støðan tann, at tað verða givin uml. 200 undantaksloyvi árliga.



# Tíðindi frá Skipara- og Navigatørfelagnum:

25-02-2014 **Dómhúsið:**

Sjófrágreiðing verður givin um vanlukkuna umborð á Anitu. Eyðstein Djurhuus er sjórættarlimur.

26-02-2014 **Kaffihúsi:**

Seinni fundur við manningar hjá Team Beresskab. Lívligt orðaskifti var um mong átrokandi mál, serliga nýggja eftirlønarlógin fekk nógva umrøðu. Avtalað var at skipa fyri einum líknandi fundi nakað áðrenn komandi sáttmálasamráðingar.

28-02-2014 **Maskinmeistarafelagið**

MF og FSN og advokatur okkara hittast til at viðgera, hvat kann gerast nú Strandferðslan framvegis ikki hevur rættað lønarbrøkarnar sambært nýggja sáttmálanum. Hetta er síðani komi í rættlag.

04-03-2014 **Tor Shipping**

Manningarfeløgini gera eina seravtalu um eftirlønarinngjald fyri Team Beredskab. Endamálið er, at limir okkara skulu fáa tíð til at tillaga seg til nýggju krøvini um pensjónsinngjald.

07-03-2014 **FSN**

Reglugligur nevndarfundur hjá FSN

13-03-2014 **Fiskmálaráðið**

Fiskivinnuráðið viðger fleiri kunngerðir, hesar eru trolveiða innanfyri 12 fjórðingar, veiða á NEAF-C økinum og veiða eftir Gulllaksi.

13-03-2014 **ALS**

Fundur í stýrinum fyri Trygdargrunnin

14-03-2014 **Vinnuhúsið**

Fundur í arbeiðsbólki um endurskoðan av sáttmálanum fyri fiskiskip. Felagsreglurnar verða gjøgnumgingnar og vit umrøða hvørjar ásetingar kunnu „moderniserast“

18-03-2014 **Løgtingið**

Manningarfeløgini eru boðin í Vinnunevndina at siga okkara hugsan um lógaruppskot um, at ein treyt fyri at fáa fiskiloyvi skal vera at mynstra verður sambært sáttmála millum manningarfeløgini og Reiðarafelagið.

04-04-2014 **Fiskimálaráðið**

Fiskivinnuráðið skal enn einaferð viðgera nýggja kunngerð um Gullaksaveiðu. Fyrra kunngerðin var kolldømd av politisku skipanini. Øll vóru ikki samd um, at gullaksaskipinini skuldu hava eginkvotu. Tí er nýggj kunngerð skivað við felagskvotu.

04-04-2014 **Vinnuhúsið**

Framhald av endurskoðan av felagsreglum við Reiðarafelagið.

07-04-2014 **FSN**

Nevndarfundur og aðalfundur í SP/F Brúgvin

07-04-2014 **Fiskimannafelagið**

Manningarfeløgini hitta útlendingadeildina hjá politinum. Vit tosa saman um nær arbeiðs- og uppihaldsloyvi er kravt fyri útlendskar fiskimenn við føroyskum skipum.

15-04-2014 **Fiskimálaráðið**

Fiskivinnuráðið viðger kunngerð um tíðaravmarkaða veiðu á Føroya Banka.

15-04-2014 **ALS**

Stýrið í Trygdargrunninum viðger innkomin tilboð uppá nýggja KT skipan

22-04-2014 **Vinnuháskúlin**

Maritima útbúgvingarráðið viðger uppskot til kunngerð um aspirantskipan og lógarbroytingar í manningarlógini.

24-04-2014 **Vinnuhúsið**

Endurskoðan av sáttmála fyri fiskiskip.

02-05-2014 **Sjóvinnustýrið. Miðvágur**

Vinnuumboð verða kunnað um ætlaðar broytingar í manningarlógini. Heimaskipari og motorpassari skulu strikast úr lógini tí hesar útbúgvingar kunnu ikki takast longur. Fyri FSN hevur hetta lítla og onga ávirkan, tí nærum ongi skip í hesi støddini reka vinnuligt virksemi. Dugnaskapsbræv í sigling fer nú at geva rætt at føra skip upp til 100 BT í stranda- og heimasigling. FSN mælti tó FMA til at brúka heimildina í lógini til at krevja hægri útbúgving á skipum undir 100 BT, um hesi føra nógv ferðafólk.

02-05-2014 **FSN**

Fundur við Antares og Magna Laksafoss um granskingarverkætlan, sum skal lýsa gongdina nú alsamt fleiri føroyskir sjómenn taka hýru við útlendskum skipum.

08-05-2014 **Vinnuhúsið**

Gjøgnumgongd av felagsreglum saman við Reiðarafelagnum

15-05-2014 **FSN**

Nevndin viðger fastlønarmodell fyri fiskiskip. Flestu av limum okkara við fiskiskipum fáa eitt ella annað slag av fastari lønarflyting hvønn mánað. Tó liggur sáttmálin til grund fyri samlaðu hýruni.

20-05-2014 **Fiskmálaráðið**

Fiskivinnuráðið viðger kunngerð um hummaraveiðu, og lógarbroyting um hækkað tilfeingisgjøld á sild og makrel.

21-05-2014 **Skansi Offshore**

Nevndin í Maritimum Forum hittist til at tosa saman um, hvat skal til fyri at fáa lív í hendan felagsskapin aftur.

27-05-2014 **Vinnuháskúlin**

Maritima Útbúgvingarráðið viðger, hvussu skúlagongdin skal skipast saman við einari aspirantskipan. Endamálið er at tryggja, at allir næmingar, sum fáa prógv samstundis eisini fáa sítt fyrsta vinnubræv.

28-05-2014 **Vinnuhúsið**

Fundur við Reiðarafelagið Fyri Farmaskip um ósemju um, hvussu § 11 (skeiðvirksemi) skal skiljast. Ósemja er um hvørt reiðarin kann krevja endurgjald fyri skeiðútreiðslur fyri menn, sum hava verið meir enn 2 ár í starvi. Málið er seinni latið Fasta Gerðarrættinum til tulking

02-06-2014 **FSN**

Nevndarfundur

04-06-2014 **Hafnia**

Ársfundur í Realinum. Tað gongst væl hjá Realinum, tað hava ikki verið stórvegis tap uppá skuldarar og ársúrslitið er eitt avlop á 32 mió., sum er nakað tað sama sum í 2012.

05-06/06-2014 **Sandefjord**

Tvey umboð frá FSN eru við til ársfundin hjá IFSMA (altjóða skipsførarafelagsskapurin). Forsetin seinastu 17 árini Christer Lindvall úr Svøríki fer frá sær vega aldur. Nývaldur er Hans Sande úr Noregi.

14-06-2014 **Vágar**

FSN skipar fyri útferð fyri nevnd og starvsfólki saman við konum og børnum. Umleið 30 fólk vóru við, vitjað var á krígssavninum, við Bøsdalafoss og í pakkhúsinum í Bø.

17-06-2014 **MF**

Kollektiva avtalan um frávik frá hvíldarreglum verður undirskrivað fyri Strandferðsluna. Umboð fyri Sjóvinnustýrið vóru við.

18-06-2014 **Kaffihúsið**

Manningarfeløgini hitta Udlændingestyrelsen. Tey eru í Føroyum fyri at kunna seg um føroysk arbeiðsmarknaðarviðurskifti. Í 2013 vóru bert 4 umsóknir viðgjørdar um arbeiðsloyvi til føroysk fiskiskip.

20-06-2014 **Sjónám Klaksvík**

Skipara- og sjóvinnuflokkurin fáa prógv. Væl av fólki vóru møtt til hátíðarhaldi.

24-06-2014 **Vinnuháskúlin**

Maritma Útbúgvingarráðið heldur fund.

27-06-2014 **Vinnuháskúlin**

Prógvhandan

01-07-2014 **Fiskimálráðið**

Kunngerð um skipan av fiskiskapi eftir sild og makreli í 2014 kemur umsíðir til ummælis hjá Fiskivinnuráðum. Mong eru sera misnøgd við, at tað hevur tikið so langa tíð at gera hesa kunngerð.

# FØÐINGARDAGAR HJÁ LIMUNUM

## Maskinmeistara-felagið

| | | |
|---|---|---|
| Julius Henriksen | 29-05-1944 | 70 ár |
| Óli Biskopstø | 17-06-1944 | 70 ár |
| Jóan Petur Kjærbo | 30-04-1954 | 60 ár |
| Hans Petur S. Djurhuus | 19-06-1954 | 60 ár |
| Zacharias Zachariasen | 14-07-1954 | 60 ár |
| Bjarki Thomsen | 22-07-1954 | 60 ár |
| Fróði K Gregersen | 17-04-1964 | 50 ár |
| Jón F. Johansen | 05-06-1964 | 50 ár |
| Jørgin Mørkøre | 15-06-1964 | 50 ár |
| Ólavur K. Gunnarsson | 30-06-1964 | 50 ár |
| Jens Jákup Hansen | 08-04-1974 | 40 ár |
| Áki Hanusarson Simonsen | 09-05-1974 | 40 ár |
| Hans Hendrik Stenberg | 15-05-1974 | 40 ár |
| Símun Jensen | 03-06-1974 | 40 ár |

## Skipara- og Navigatørfelagið

| | | |
|---|---|---|
| Páll Rubeksen | 04-09-1944 | 70 ár |
| Finnbjørn Hovsgarð | 27-07-1944 | 70 ár |
| Johannes Lambá | 24-04-1954 | 60 ár |
| Dánjal Pauli Zachariassen | 03-05-1954 | 60 ár |
| Agnar Poulsen | 21-05-1954 | 60 ár |
| Jørgin Leo Djurhuus | 08-06-1954 | 60 ár |
| Aksel Dahl Olsen | 11-06-1954 | 60 ár |
| Eli Lyngvej-Larsen | 14-06-1954 | 60 ár |
| Danial Johan Joensen | 28-06-1954 | 60 ár |
| Kjartan Poulsen | 25-07-1954 | 60 ár |
| Regin Henriksen | 17-04-1964 | 50 ár |
| Terji Lauritsen | 23-05-1964 | 50 ár |
| Vónbjartur Mittelstein | 01-06-1964 | 50 ár |
| Jóin Ellingsgaard | 10-06-1964 | 50 ár |
| Kristian Dam | 13-06-1964 | 50 ár |
| Laurits Weihe | 19-06-1964 | 50 ár |
| Magnus Neslíð | 21-06-1964 | 50 ár |
| Róin Joensen | 03-07-1964 | 50 ár |
| Martin Jóanessarson | 12-07-1964 | 50 ár |
| Líggjas Johannesen | 14-07-1964 | 50 ár |
| Dan Ingi Andreasen | 14-07-1964 | 50 ár |
| Rúni Samuelsen | 31-07-1964 | 50 ár |
| Jan Hansen | 29-05-1974 | 40 ár |
| Dan Eyvindsson | 08-06-1974 | 40 ár |
| Mikkjal Olsen | 18-06-1974 | 40 ár |
| Heri Godtfred | 28-06-1974 | 40 ár |
| Elias Sonni Zachariassen | 30-06-1974 | 40 ár |
| Pauli Højgaard | 07-07-1974 | 40 ár |
| John Bergur Park (y) | 07-07-1974 | 40 ár |
| Marner Ási Kjærbæk | 08-07-1974 | 40 ár |
| Poul A Jensen | 20-07-1984 | 40 ár |



TÍN TRYGD
- ER TÍN ÁBYRGD!

Eru landgonguviðurskiftini trygg ?
Nýtir tú persónliga trygdarútgerð ?
Er bjargingarútgerðin tøk og í lagi ?
Halda tit bjargingar- og brandvenjingar regluliga?
Yvirheldur tú kravdu hvílutíðina ?

- eisini vit vilja,
at tú ert trygg/-ur!

SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

Sjóvinnustýrið . Inni á Støð 22 . Postrúm 28 . 370 Miðvágur . Tlf 35 56 00 . Fax 35 56 01 . Teldupostur fma@fma.fo . Heimasíða www.fma.fo

# Nýggj sjóvinnubrøv: Neyðugt at koma í góðari tíð

Í seinasta lagi við árslok í 2016 skulu allir føroyskir sjómenn hava fingið nýtt vinnubræv frá Sjóvinnustýrinum. Tað hendir í sambandi við, at Manilla STCW 2010 sáttmálin verður settur í gildi



Chrilstel Christoffersen deildarleiðari og Ása T. Djurhuus løgfrøðingur hjá Sjóvinnustýrinum.

Hetta fer at krevja nógv av Sjóvinnustýrinum; tað tekur í minsta lagi tvær vikur at avgreiða eitt vinnubræv. Tað eru nógvir upplýsingar, sum vit skulu gjøgnumganga, og skjøl, sum skulu eftirkannast. Tí er neyðugt, at vit fáa ta tíð – sum krevst – til at avgreiða hvørt einstakt mál. Og tí er eisini neyðugt, at tey, sum skulu hava vinnubræv, venda sær til Sjóvinnustýrið í góðari tíð frammanundan.

Tað siga tær báðar, Christel Christoffersen, deildarleiðari á umsitingar- og manningardeildini, og Ása T. Djurhuus, løgfrøðingur og ráðgevi, hjá Sjóvinnustýrinum.

## Kannið nýggju treytirnar

Broytingarnar í krøvunum til sjóvinnubrøvini seta nýggj krøv, men tey raka ikki tey, sum eru undir útbúgving nú.

Føroysku sjóvinnuútbúgvingarnar lúka longu nýggju krøvini, og tí er ikki neyðugt við stórvegis broytingum fyri at kunna útskriva vinnubrøv sambært nýggju krøvunum, sigur Christel Christoffersen.

## Navigatørar

Christel vísir á, at allir navigatørar, sum hava fingið útbúgving eftir 2006 lúka longu øll krøvini, og tí kunnu allir hesir fáa nýtt vinnubræv útskrivað eftir 1. september í ár. Er útbúgvingin hinvegin eldri enn 2006, verður neyðugt at taka skeið í ECDIS og AIS. Verður ECDIS-skeiðið tikið í Føroyum, er AIS partur av skeiðinum.

Harumframt skulu allir skiparar og skipsførarar hava eitt skeið í „tangaskipi" og eitt BRM-skeið.

## Maskinmeistarar

Eisini maskinmeistararnir fáa nýggjar treytir. Teir skulu nú hava eina „elektrotøkniliga" átekning, og fyri at fáa hana er neyðugt við einum víðkaðum skeiði, sum fæst við at venda sær til Vinnuháskúlan. Harumframt skulu teir hava skeið í „tangaskipi" og eitt ERM-skeið.

## Øll skjøl skulu inn

Tær báðar mæla øllum sjómonnum til at vera væl fyrireikaðir, tá vinnubrævið skal endurnýggjast. Tað snýr seg um at leggja øll neyðug skjøl saman við umsóknini, annars kann viðgerðin ikki fara í gongd og málið verður ikki avgreitt í Sjóvinnustýrinum.

Eru neyðugu skjølini ikki við, tá søkt verður, so kunnu vit ikki avgreiða málið. Tað er so einfalt sum tað. Tí er tað upp til hvønn einstakan at syrgja fyri, at øll neyðug skjøl fylgja við umsóknini. Er onkur í iva, so mæla vit til, at fólk lesa tað, sum stendur á heimasíðuna hjá Sjóvinnustýrinum *www.fma.fo*

Á heimasíðuni er greitt frá øllum sum krevst, tá søkt verður. Áðrenn tað kann málsviðgerðin ikki byrja, sigur Christel Christoffersen.

## Ein stór arbeiðsbyrða

Í fjør útskrivaði Sjóvinnustýrið umleið 1.430 vinnubrøv, í 2008 var talið undir 400. Talið er støðugt vaksið síðani til yvir 1.400 í fjør, og har á leið hevur talið ligið seinnu árini. Tí er neyðugt, at sjómenn skilja, at teir mugu koma í góðari tíð, og ikki bíða til í síðstu løtu.

Tað er orsøkin til, at vit eru so tíðliga úti við boðunum, so vit sleppa undan einari langari bíðirøð við nógvum trýsti á allar partar, sigur Christel Christoffersen at enda í samrøðuni við MIÐ & MAGN.

Leinkja til sjóvinnubrævið:
http://www.fma.fo/get.file?ID=12402



# Sjúrður Samuelsen: Frá Søfartsstyrelse til Sjóvinnustýrið

Sjúrður Samuelsen hevur arbeitt sum skipaeftirlitsmaður í nærum 30 ár. Seinnu árini er stórur partur av eftirlitsarbeiðinum hjá Sjóvinnustýrinum latið privatum at taka sær av. Broytingarnar hava gjørt, at arbeiðið er vorðið meira eintáttað og tí støðast tey skipakønu ikki væl. Sjúrður er í dag einsamallur maskinmeistari í Sjóvinnustýrinum



Sjúrður Samuelsen hevur arbeitt sum skipaeftirlitsmaður síðan 1984.

Tá Sjúrður varð settur í starv 1. august 1984 nevndist stovnurin Søfartsstyrelsen. Tá var talan um danskt málsøki. Eftir yvirtøkuna varð stovnurin fluttur vestur í Vágar; tað hevur ikki bøtt um tænastuna hjá stovninum, sigur Sjúrður avgjørdur.

## Hevur holla útbúgving

Sjúrður greiður okkum frá, at hann var 16 ára gamal tá hann fór at læra til maskinsmið hjá Tórshavnar Skipasmiðju. Tá hann var liðugur at læra fór hann í maskinistskúla. Eftir lokna maskinistútbúgving var vanligt at fara til skips. Sjúrður fekk ein trolaratjans, men tað var skjótt, at honum var greitt, at hugurin ikki stóð til sjógvin. Hann flutti tí til Danmarkar at taka tað, sum teir nevndu víðkaða maskinmeistaraprógvið.

Heimafturkomin í 1975 fekk hann starv hjá SEV á Sundi.

Í hesum starvi var Sjúrður til hann 1. august 1984 varð settur í starv hjá Søfartsstyrelsen, sum tá hevði skrivstovu í Havn.

Sjúrður greiður frá, at fyrstu nógvu mánaðirnar varð hann upplærdur í Danmark á fleiri ymiskum plássum. Eg byrjaði í danska direktoratinum, eftir hetta gekk leiðin til Lemvig í Jyllandi, síðan til Frederiksberg og Svendborg. Og eg endaði rundferðina á Bornholm. Tað var ein lærurík rundferð, sum hevði brynjað meg væl til byrjanina í Føroyum. Greiðir Sjúrður frá.

1. mai 1985 byrjaði eg á skrivstovuni hjá Statens Skibstilsyn í Havn.

## Nógvur gjøgnumtrekkur

Tá ið vit spyrja Sjúrð, hvussu arbeiðið er broytt hesi árini hann hevur arbeitt sum skipaeftirlitsmaður, gerst okkum greitt, at hann er trúgvur ímóti sínum arbeiðsplássi og sínum starvsfeløgum.

Sjúrður leggur dent á, at hann bara hevur gott at bera starvsfeløgum og arbeiðsgevara.

Tá hann greiður okkum frá sínum lívsroyndum, fjalir hann kortini ikki, at tað eru viðurskifti, sum hann ikki skilir. Millum annað avgerðin um at flyta eftirlitið úr Havnini. Tað gevur onga meining, heldur hann, og er í nógvar mátar bara truplari fyri allar partar.

Tá eg byrjaði sum skipaeftirlitsmaður var tað tiltikið, at fólk støðaðust væl, men tað kunnu vit ikki siga nú. Hesi 12 árini síðan yvirtøkuna eru 26 fólk komin og farin, og tað er alt annað enn heppið, sigur Sjúrður Samuelsen.

Hann fýlist eisini á, at stovnurin útveitir ein stóran part av uppgávunum til aðrar, og tí er serfrøðin ikki á stovninum - í sama mun sum hon var.

## Aktiva frítíð

Hóast Sjúrður er um at røkka pensjónsaldur, so sæst aldur ikki á honum. Men alt hevur sína orsøk.

Eg siti nógv á arbeiðsplássinum, og tí svimji eg nógv og eg renni nógv, greiðir Sjúrður frá. Eg svimji hvønn yrkadag, einar 5 kilometrar um vikuna, og eg renni einar tríggjar til fýra ferðir um vikuna, íalt einar 20 kilometrar um vikuna, greiðir hann frá.

Harumframt hevur hann ross og trøð, og sum um tað ikki var nóg mikið, syngur hann eisini við Havnarkórinum. Tað er einki at siga til, at hann fer tíðliga upp hvønn morgun, um hann skal røkka øllum setningunum.

Tað er soleiðis eg trívist best, og tað ætli eg mær at gera í eina tíð enn, sigur Sjúrður Samuelsen.

# Væl eydnaðar royndir við alternativum orkuskipanum

Jarðfeingi hevur síðan 2008 kannað, hvussu jarðhitaskipanir roynast í Føroyum. Hesar kanningar vísa, at jarðhitaskipanir virka minst líka væl í Føroyum sum í okkara grannalondum. Hóast íløgan í eina jarðhitaskipan er størri enn íløgan í eina vanliga skipan við oljufýring, so er kortini nógv at spara í longdini.



Kári Mortensen, hevur staðið fyri kanningunum, sum Jarðfeingi hevur gjørt síðani 2008.

Kári Mortensen, sum starvast hjá Jarðfeingi hevur verið við øll árini síðani Jarðfeingi fór undir kanningarnar í 2008. Vit hava gjørt royndir í 4 ymiskum bygningum, og tølini tala sítt týðiliga mál.

## Stór sparing

Tá hugsað verður um, at tað kostar millum 30 og 40.000 krónur at fáa sær eina oljufýring, er í fyrsta umfari kanska einki at siga til, at fólk aftra seg við at velja jarðhitaskipanina framum.

Sambært Kára Mortensen eigur tað tó ikki at halda fólki frá at velja jarðhita, sum kostar umleið 150.000,- kr. til eini sethús.

– Eftir mínum tykki er alt frægari enn olja og oljufýr. Eisini tær „vanligu“ lufthitapumpurnar. Men úrtøkan úr jarðhitaskipanini er betri enn hon er í vanligum hitapumpum, og tí er tað í síðsta enda skilabetri at brúka jarðhita, sigur Kári Mortensen.

Hann hevur dømi um ein sethúsaeigara, sum skuldi skifta oljufýringina út, hann hugsaði um hann skuldi keypa sær eina nýggja oljufýring ella um hann skuldi gera eina íløgu í eina jarðhitaskipan. Úrslitið var, at hann skifti til ta dýraru loysnina, jarðhitan, men tað hevur hann ikki angrað, greiðir Kári Mortensen frá.

– Viðkomandi sparur millum 1.500 og 1.700 krónur um mánaðin, tí nú keypir hann ikki olju longur. Ístaðin brúkar hann á leið tað dupulta í el, men tað er so nógv bíligari, og hann sparir fitt av peningi, eisini tá lánsgjaldið fyri íløguna er tikið við, greiðir Kári Mortensen frá.

## Stuðul er ein møguleiki

– Tað fyrikemur mær, at prísurin má niður, um vit ordiliga skulu fáa ferð á. Fólk aftra seg og fíggingarstovnar tykjast ikki síggja tað gløgga í, at fólk sum byggja nýtt, velja jarðhita heldur enn oljufýr. Sjálvt um tey við einari slíkari íløgu spara hópin av pengum, sigur Kári Mortensen.

Í hansara hugaheimi eru tveir áhugaverdir møguleikar, sum í fyrsta umfari kunnu lækka prísin og sum kunnu gera íløguna meira átuliga fyri húsaeigarar og fíggingarstovnar.

– Fáa vit kapping millum fleiri veitarar at selja jarðhitaskipanir, so kunnu vit ganga út frá, at prísurin lækkar. Eisini kann landið spýta í kassan við stuðli, eins og tað t.d. verður gjørt í Danmark og í Svøríki. Tað lækkar ikki samlaða íløgukostnaðin, men tað ger íløguna hjá brúkaranum lægri, sigur Kári Mortensen.

## Tungur burður

Sjálvt um Kári Mortensen er púra ivaleysur í, at tær alternativu orkukeldurnar eru meira samfelagsliga gagnligar enn olja, og sjálvt um tað „irriterar“, at enn eru bara borað umleið 100 jarðhitahol í Føroyum, so hevur hann kortini ikki mist mótið.

– Tað harmar meg eitt sindur, at vit ikki eru komin longur, tí hetta er ein frálíkur – og samfelagsliga gagnligur – møguleiki. Sjálvt um íløgan er kostnaðarmikil, er talan um eina skilagóða íløgu, tí hon sparir seg innaftur. Og hægri oljuprísurin verður, jú skjótari sparir hon seg innaftur, sigur Kári Mortensen.

# Jarðhiti var rætta loysnin

Í staðin fyri oljufýring, valdu Jarnhold og Edith Nattestad at fáa sær jarhitaskipan, tá ið tey bygdu sær nýggj hús í Sandavági, fyri 16 árum síðani. Skipanin hevur riggað væl og tey hava – á hvørjum ári – spart fitt av peningi



Húsini hjá Jarnhold og Edith Nattestad vóru millum tey fyrstu í Føroyum, sum fingu jarðhitaskipan.Skipanin hevur spart teimum í minsta lagið 10.000,- kr. um árið, síðan 2008.

Jarnhold Nattestad og konan Edith valdu oljuna frá, tá tey bygdu í Sandavági fyri 16 árum síðani.

Tey valdu eina við jarðhitaskipanina, og hana eru tey sera væl nøgd við

– Vit hava verið stak væl nøgd við jarðhitaskipanina, tí hon hevur virkað so væl. Tað sigur Jarnhold Nattestad, sum hevur jarðhita í húsum sínum á Liljuteigi í Sandavági.

Tá Jarnhold Nattestad og konan Edith skuldu fara at byggja í 2008, umhugsaðu tey hvørja alternativa hitaskipan tey skuldu velja. Tá høvdu tey gjørt av, at tey vildu ikki hava oljufýr í húsunum.

Hetta var um sama mundi, sum Jarðfeingi leitaði eftir fólki at vera við í verkætlanini við jarðhita. Partarnir hittust og stutt eftir var samstarvið ein veruleiki. Familjan Nattestad valdi jarðhita og gjørdist partur av verkætlanini hjá Jarðfeingi.

## Bara smávegis trupulleikar

Fimm bygningar skuldu vera við í kanningini. Umframt nýggju sethúsini hjá Jarnhold og konuni Edith í Sandavági, vóru eini eldri sethús í Froðba, tveir virkisbygningar í Havn og so skrivstovubygningurin hjá Jarðfeingi í Hoyvík.

– Nú vóru vit tey fyrstu, sum fingu jarðhita, og tí var okkurt smátt, sum kundi verið gjørt øðrvísi t.d. kundi vatntangin verið størri. Men burtursæð frá tí hevur einki verið. Vit hava verið serstakliga væl nøgd við skipanina hjá okkum, sigur Jarnhold Nattestad.

Øll hesi árini vit hava havt jarðhita, haldi eg, at eg bara einaferð havi verið úti fyri, at vatnið í brúsuni er vorðið kalt. So tað er ikki nakar stórur trupulleiki.

## Rættiliga stór sparing

Hjá familjuni Nattestad sær roknistykki á leið soleiðis út: Tey fáa umleið 21.000 kW-tímar úr jarðhitanum, og fyri tað rinda tey umleið 10.000 krónur um árið til SEV fyri hitapumpuna, sum er knýtt at skipanini.

Umroknað vit kilowatttímarnar til litrar av olju, hevði tað givið 2.625 litrar. Ein litur av olju gevur 10 kW-tímar, og effektin á einari oljufýring er umleið 80 prosent, sum er sama tal, sum Jarðfeingi brúkar í sínum útrokningum.

Við verandi oljuprísi, sum er 7,863 krónur fyri liturin, høvdu teir 2.625 litrarnir kostað 20.670 krónur, og tí er sparingin í minsta lagi 10.000 krónur um árið.

Spyrt tú oljufeløgini, hvussu nógva olju eini sethús, sum tey hjá familjuni Nattestad brúka, so er svarið 3.000 litrar. Tí er ikki óhugsandi, at sparingin táttar í umleið 13.000 krónur um árið.

Tí himprast Jarnhold Nattestad í dag ikki við at viðmæla jarðhita:

– Fyri nøkrum árum síðan helt eg, at tað tók ov langa tíð at spara íløguna innaftur. Men nú er støðan ein onnur, tí oljuprísurin er so høgur. Og hann hækkar bara enn meira. Og tá skipanin hjá okkum eisini hevur virkað væl, kann eg bara geva henni mítt viðmæli, sigur hann.

## Atli Nattestad:

# Landið eigur at ganga undan

Atli Nattestad, HVS-installatørur hjá Demich, heldur, at landið má ganga undan, tá talan er um alternativa orku. Men tað tykist ikki, sum myndugleikarnir vilja gera íløguna, sum kann spara landinum nógvan pening

Tá landið fer undir eina so stóra verkætlan sum Marknagilsdeplin, mátti tað at verið ein sjálvsagdur møguleiki at valt jarðhita, heldur enn at hita depilin við olju.

Tað sigur Atli Nattestad, HVS-installatørur hjá Demich. Hann saknar eitt tekn frá landsstýrinum um, at føroyskir myndugleikar vilja satsa uppá alternativa orku.

Fyri nøkrum árum síðan varð samtykt, at útlátið av veðurlagsgassum skal minkast munandi. Fram til 2020 skal útlátið, sum tað var mált í 2005, minkast við 20 prosentum.

Tað er longu greitt, at skal útlátið minkast, so skal okkurt munagott gerast við upphiting av sethúsum og øðrum bygningum. Júst hesin partur stendur fyri einum rættiliga stórum parti av øllum útláti, tí bygningarnir vera upphitaðir við olju – frá hvør sínari oljufýring.

Í hesum sambandi eru jarð- og sjóhitaskipanir eitt alternativ, sum – við góðum úrsliti – eru royndar í mong ár.

### Lutfalsliga stór íløga

Í løtuni er støðan tann, at íløgan í eina jarðhitaskipan er lutfalsliga stór. Tosa vit um eini sethús, liggur íløgan um einar 150.000 kr. Er talan um størri bygningar, so er sjálvandi talan um størri upphæddir.

Og fyri ein so stóran bygning sum Marknagilsdeplin so er sjálvandi talan um eina rættuliga stóra íløgu.

Men tað er kortini samanhangur í, tí við høga oljuprísinum, sum bara hækkar, verður íløgan skjótt spard innaftur. Og jú meira oljuprísurin hækkar, skjótari verður íløgan spard innaftur.

Atli Nattestad leggur dent á, at tað er búskaparligt skil í einari slíkari íløgu. Bæði fyri borgaran, sum við tíðini sparir pening, og fyri landið. Bæði tá tað snýr seg um minni innflutning av dýrari brenniolju og tá tað snýr seg um útlátið.

Við tíðini kunnu vit rokna við, at íløgukostnaðurin lækkar, men sjálvt um vit í løtuni tosa um eina lutfalsliga stóra íløgu, so hevði roknistykkið við tíðini givið pluss, og tí hevði tað eftir okkara tykki verið skilagott at gjørt íløguna, sigur Atli Nattestad.

# Marknagilsdepilin



Bjørn Kalsø, landsstýrimaður í mentamálum vildi ikki aftur í løgtingi við Marknagilsdeplinum.

Tað var Bjørn Kalsø, ið sum landsstýrismaður við mentamálum hevði ábyrgdina av at fáa málið um Marknagilsdepilin ígjøgnum Løgtingið. Hann varðar ikki av orkupolitikkinum, men viðgongur kortini, at tað er eitt óheppið orkupolitiskt signal frá myndugleikunum.

Málið um Marknagilsdepilin snúði seg um, hvussu nógvir pengar skuldu játtast til byggingina. Tá eg fekk málið var allur hesin parturin avgreiddur, og skuldu vit hava eina alternativa orkuskipan inn, so máttu vit spara samsvarandi upphædd aðrastaðni. Tann møguleikan tordi eg ikki at taka, sigur Bjørn Kalsø.

Men skilir tú ikki, at fólk undrast yvir, at landsmyndugleikin, sum samtykkir at minka um útlátið av veðurlagsgassum, sjálvur loypir uppum, har sum garðurin er lægstur?

– Ja, tað skilji eg væl, men eg kann leggja afturat, at depilin er gjørdur til at taka ímóti einari alternativari orkuskipan, sum t.d. jarðhita, men í fyrsta umfari er hon vald frá, sigur Bjørn Kalsø. Hetta er gjørt hóast talan hevði verið um stórar sparingar í rakstrinum?

– Ja. Tí vit í byggifasuni skuldu hava íløgupeningin játtaðan, og sum støðan var, tá málið varð samtykt, var tað ikki ráðiligt at fara at pilka við uppskotið, sigur landsstýrismaðurin við mentamálum.

# Skeivur politikkur



Johan Dahl er landsstýrismaður við orkumálum. Tí er tað hann, sum hevur politisku „ábyrgdina" fyri, at Føroyar røkka teimum ásetingum, sum eru settar á orkupolitiska økinum.

Hann kann ikki annað enn geva kritikarunum rætt í, at tað er sera óheppið, tá eingin samanhangur er millum tey veðurlagspolitisku málini og tey stig, sum landsstýrið og løgting taka, eitt nú, tá farið verður undir so stórar byggiverkætlanir, sum Marknagilsdeplin er.

– Vit mugu bara viðganga, at tað er ikki gott nokk, tí í hesum føri kundu vit gjørt nakað munagott á rættari leið, sigur Johan Dahl. Jarðfeingi hevur gjørt royndirnar við jarðhita, og man kann lesa um úrslitini av royndunum á teirra heimasíðu. Men í veruleikanum hevur eingin ábyrgdina av at greiða borgarunum frá teimum møguleikum og sparimøguleikum, sum liggja í jarðhitaskipanini og øðrum líknandi alternativum orkukeldum, sigur Johan Dahl.

Tí verður tað í stóran mun upp til borgararnar sjálvar og teirra vilja til at finna alternativar mátar at hita húsini upp. Tá kann tað taka drúgva tíð at broyta hugburð?

– Tað er rætt. Vit eiga at gera eitthvørt, sum ger tað lættari hjá øllum at finna alternativar mátar at hita hús upp, men eg havi einki uppskot beint her og nú, hvat vit skulu gera. Tað er tó greitt, at í slíkum førum eigur landið at ganga undan, og tann kritikkin eiga vit at taka til okkum, sigur Johan Dahl.

# Hægri stuðul kundi sett ferð á

Alt árið 2013 seldi Demich 25 jarðhitaskipanir, higartil í ár hava teir selt umleið 40 jarðhitaskipanir. So her er talan um munandi vøkstur.

Hóast sølan av jarðhitaskipanum er vaksin nógv seinasta árið, so eru serfrøðingarnir ikki nøgdir. Semja tykist at vera um, at tað hevur gingið eitt sindur seinni enn væntað.

Í verandi løtu kann eg ikki siga, um landskassin fer at veita stuðul til alternativar orkuskipanir. Vit hava málið frammi, men eru ikki komin til nakra niðurstøðu tí viðvíkjandi.

Tað sigur Johan Dahl, landsstýrismaður við orkumálum, tá hann verður spurdur, um landsstýrið ætlar at koma við einari stuðulsskipan, so íløgan ikki verður so stór, sum hon er í dag.

Síðan farið var undir jarðhitaskipanir í Føroyum eru 100 hol borað, og sambært Kára Mortensen og Atla Nattestad er tað í minna lagi. Sambært teimum báðum serfrøðingunum á økinum er høgi íløgukostnaðurin orsøkin til varsemi, og tí vera slíkar skipanir ofta spardar burtur, um skarvast skal av verkætlanini.

Tað er tó okkurt sum bendir á, at glið er við at koma á, vísir Atli Nattestad á.

### 25 skipanir í 2013

– Alt árið í fjør seldu vit 25 skipanir, og higartil í ár hava vit selt 40. Tí hevði tað kanska verið skilagott, at sett í verk eina stuðulsskipan, sum man t.d. hevur gjørt í Danmark og Svøríki. Tað hevði sett meira ferð á, sigur hann.

Í løtuni er einasti stuðulin, sum landið veitir, eitt orkulán frá Bústøðum. Rentan er 2,75 prosent og lánið er ætlað sum ein stuðul til orkusparandi og grøn tiltøk.

Eitt lán uppá 150.000 krónur kostar 820 krónur um mánaðin í 20 ár. Tí kann íløgan við verandi oljuprísum gerast uttan eyka kostnað, ella sum ein samlað sparing.

### Støðan í Havn

Nógv tey flestu sethúsini í Føroyum eru seinastu árini bygd í Hoyvíkshaganum. Og tá hugsað verður um, at tað hevur verið eitt krav, at tey skuldu bindast í skipanina hjá Fjarhitafelagnum, so er tað helst ein orsøk til, at talan ikki hevur verið um munandi vøkstur, tá talan er um alternativar orkuskipanir, sum t.d. jarðhita.

GARDINBÁTAR

# Tá gardinubáturin blívur ein marra

Alsamt fleiri føroyingar brúka havið til hugna og spæl. Men kunnleikin um trygd fylgir ikki altíð við, og vit hava eina stóra kunningaruppgávu fyri framman, heldur Annfinnur Garðalíð

*eftir Gunnar Skúvadal*

„Familjan hevði glett seg í fleiri vikur til bátastevnutúrin. Og við fullari last av bæði vátum og turrum løgdu tey til brots, lítið vitandi um vandarnar sum lúra, tá sjóvarfall og sjómansskapur ikki er tað sum liggur fremst í huganum."

Hetta kundi verið byrjanin til eina søgu við einum syrgiligum enda. Á hvørjum sumri stevna fleiri hundrað bátar úr bygd og bý gjøgnum sund og firðir at vera við í eini av nógvu bátastevnunum, sum verða fyriskipaðar kring alt landið. Og tað var við einum líknandi hugsaðum dømi í huganum, at umboð fyri bátafelagið á Strondum skipaði fyri temadegi um trygd á sjónum. Tiltakið, sum var í ítróttarhøllini á Skála, var serliga ætlað teimum, sum ikki fáast við bát og trygdarútgerð til dagligt. Ella við øðrum orðum, teimum sum manna teir sonevndu gardinbátarnar, sum fylla føroysku havnirnar um sumrarnar, har stevna er.

– Tað er mín heilt greiða fatan, at tann vanligi føroyingurin, sum ikki fæst við bát hvønn dag, men kanska av og á er í báti til stuttleika, veit alt ov lítið um trygd og vandar á sjónum, segði annar fyriskiparin, Annfinnur Garðalíð, eftir temadagin. Hann er peningarøkil í bátafelagnum „Kahyttin" sum heldur til á Skála, og


Annfinnur Garðalíð

tað var hetta felagið, sum tók stig til temadagin um trygd á sjónum tann 15.mars.

Frits Thomsen, sjómansskúlalærari, tosaði á degnum um sjóreglur, sigling og streymlæru, ljósføring og hvussu ein lesur Álmanakkan. Annfinnur tosaði sjálvur mest um lógina um trygd á sjónum og um smábátar upp til 20 tons. Og, kanska ikki minst, so var eisini á skránni framvísing av trygdar- og samskiftisútgerð á sjónum, sum tey luttakandi sluppu at royna.

78 fólk møttu til tiltakið, tað var nógv meira enn fyrireikararnir høvdu væntað, og tað halda teir vísir, at hóast kunnleikin kanska ikki er hin størsti, so er áhugin til staðar at læra meira um trygd á sjónum og at brúka trygdarútgerð.

Tey sum møttu vóru mest av Skálafjørðinum, men eisini fólk úr øðrum pørtum av landinum vóru við. Og onkur áheitan er síðani komin frá øðrum bátafeløgum til tey í „Kahyttini" um at endurtaka tiltakið.

Dagurin kostaði onki fyri tey sum vóru við, tí Skipara- og Navigatørfelagið og Tryggingin veittu fíggjarligan stuðul eins og Fønix kom við allari trygdarútgerðini, so sum neyðrakettum, gummibáti, yvirlivilsisdraktum og so framvegis. Og Radiobúðin í Runavík kom við allari samskiftisútgerðini, sum fólk kundu royna.

– Tað er eitt rák í tíðini, at fleiri og fleiri fólk fáa sær bát ella kampingvogn. Tey brúka meira tíð enn áður at ferðast í egnum landi, og tað


*Bjargingarglúpurin verður royndur.*


*78 fólk møttu til temadag.*

er sjálvandi gott. Men tað er ikki tað sama at fara ein túr við kampingvogni sum at fara ein túr við báti. Á sjónum eru vandarnir bæði fleiri og størri, minnir Annfinnur Garðalíð á. Fleiri pør, sum júst høvdu keypt bát, ella kanska leingi hava átt bát, vóru við á temadegnum um trygd, og tað var týðuligt, at tey ikki høvdu so stóran kunnleika um, hvussu tú reint praktiskt brúkar trygdarútgerðina.Tað søgdu tey sjálvi.

– Fólk fara við bátinum at hugna sær, tey hava eina øl ella tvær við, og tað er alt í lagi við tí. Men tað má bara ikki enda við eini tragediu av berum kleyvarskapi. Tað skal vera gott at koma heim aftur. Hugburðurin má ikki vera, at so leingi tað er gott pláss umborð, so „kom tú bara við eisini". Fokus má vera á trygdini, og tað mugu ikki fleiri fólk sleppa við enn tað er bjargingarútgerð til, sigur Annfinnur Garðalíð.

Á temadegnum bleiv eisini nógv gjørt burturúr at vísa, at bjargingarútgerðin í dag er ikki tann sama sum fyrr í tíðini. Hon er so nógv lættari at brúka. Tað eru vestarnir, sum kappróðrafólkið brúkar, eitt gott dømi um, helt onkur fyri. Teir eru so lættir, at róðrarfólkið kann sita í teimum meðan tey rógva uttan at verða darvað. Eisini finnast í dag termoklæðir við uppdrift. Klæðir, sum tú kanst ganga í, og arbeiða í, og sum halda tær á floti, um illa vil til. Eisini hugsa tey, sum framleiða, um snið og litir, so til ber at vera smartur og tryggur alt í einum.

– Men tað eru bátafeløgini kring landið, sum eftirhondini eru fleiri í tali, sum hava eina stóra uppgávu at upplýsa og útbúgva sínar limir, so trygdin altíð er í hásæti á sjónum, eisini hjá gardinbátunum, heldur Annfinnur Garðalíð.

Og eftir hansara tykki skuldi tað verið krav, at øll fólk sum sigla, eisini frítíðarsiglarar, skuldu havt dugnaskaparroynd í sigling, áðrenn tey sluppu at loysa.

– Hví skulu vit krevja koyrikort frá hvørjum fólki sum fer á eitt prutl, tá vit ikki forlanga av fólki, sum sigla, at tey skulu taka prógv, spyr Annfinnur. Tað dugur ikki, at summi, sum sita við stýripinnin, kenna reglurnar, meðan summi ikki duga nakað. Øll skuldu havt ein minstaførleika, heldur Annfinnur Garðalíð og nevnir at eitt nú Danmark hevur nógv strangari lóg hesum viðvíkjandi enn vit.

– Tað er ikki nóg gott, tá vit kalla okkum eina siglandi tjóð, leggur hann afturat.

Á temadegnum bleiv eisini tosað um stóru ferðina, sum nógvir bátar kunnu sigla í dag, og vandan sum kann standast av tí, um førarin ongar førleikar hevur at føra ein skjóttgangandi bát.

– Eg havi fleiri ferðir sjálvur verið á veg av Havnini og inn til Runavíkar og tú fært nóg illa siglt eftir reglunum, tí har eru so nógvir bátar við fólki sum ikki duga reglurnar. Er tað mjørki, so eru teir sum marflugur á radaranum, tekur Annfinnur Garðalíð til.

Hann heldur eisini, at myndugleikarnir áttu at hert eftirlitið við smábátum og sonevndum frítíðarsiglarum. – Men, sjálvandi, tað er ein stórur biti, tí har eru so nógvir bátar, so tað er lættari sagt enn gjørt. Men onkustaðni noyðast vit at byrja.

Ein annar spurningur, sum hevur verið umrøddur í samband við bátastevnurnar, er um tað skal vera loyvt at smakka sær á undir sigling. Eisini tann spurningurin var frammi á temadegnum um trygd.

– Fólk eru kanska ymisk á málið, men í míni verð er ongin ivi, segði Annfinnur Garðalíð.

– Eg haldi at promillusigling skuldi verið bannað eins og promillukoyring. Tað átti ikki at verið loyvt at siglt um tú ert tað minsta ávirkaður. Markið skuldi verið so tætt við 0 sum gjørligt. Tí eins og við ferðsluni á vegunum, so setur tú ikki einans teg sjálvan í vanda. Mangan verða eisini onnur sett í stóran vanda, tá tú gert okkurt býtt, vísir kassameistarin í Kahyttini á.

# Vanlukkan umborð á Anitu

Annfinnur Garðalíð hevur sjálvboðin fylgt málinum síðani sjóforhoyr var í Føroya Rætti

11. februar 2014 hendi ein syrgilig vanlukka umborð á føroyska garnaskipinum Anita. Henda dagin varð ein maður farin fyri borð og ikki funnin aftur.

Ikki fyrr enn skipið kom inn at landa var sjóforhoyr í Føroya Rætti. Maðurin, ið var sjólátin var tann 34 ára gamli Saefundin Hasanah, úr Indunesia.

## Ongin spurdi um bakgrundina

Annfinur Garðalíð hevur fylgt málinum og greiður frá, at ígjøgnum alla tilgongdina var tað ongin, sum t.d. spurdi um bakgrundina hjá Saefundin Hasanah, t.d. hvussu var støðan hjá familjuni ? Hvat fingu tey at vita um vanlukkuna?

Av hesi orsøk setti Annfinnur Garðalíð sær fyri at royna at fáa samband við familjuna hjá Saefundin Hasanah.

Við góðari hjálp frá indonesisku manningini, eydnaðist Annfinni at fáa greiðu á, hvussu støðan hjá familjuni var.

Tað vísti seg, at eftir sat einkja og 2 ára gamla dóttir teirra.

## Støðan heima í Indonesia

Av tí at einkjan – stórt sæð – einans fekk at vita, at maðurin, í einum óhappi, var farin fyri borð og ikki funnin aftur, søkti Annfinnur Garðalíð um innlit í sjófrágreiðingina. Endamálið var, at einkjan og familja hennara, skuldi fáa atv vita, hvat var hent, og hvat varð gjørt fyri at finna mannin.

Tá ið Annfinnur fekk frágreiðingin vísti tað seg, at hon var skrivað á donskum, og hon var drúgv, 9 A4 síður. Við góðari hjálp frá Fiskimannafelagnum varð frágreiðingin umsett til indonesiskt, og 27. juni varð hon send í telduposti til einkjuna. Hesum tók Annfinnur sjálvboðin sær av.



*Um bakgrundina*
*Saefundin Hasanah varð føddur 4. juli 1979 í Indonesia.*
*Einkjan: Kuswatun Hasanah er fødd 26. august 1987*
*Dóttirin: Nasya Aqila Hasanah er fødd 7. februar 2012*

*Á myndini omanfyri, er Saefundin uttast høgrumegin.*

## Manningin send heim við 270 kr.

Av tí at Anita ikki slapp til fiskiskap eftir sjóforhoyrið, var manningin send av landinum við flúgvara tann 12. mars 2014. Til ferðina heim fingu teir 50$ (um 270,- kr.) í part, at lívbjarga sær við, á drúgvu ferðini úr Føroyum til Indonesia. Ferðin tók teimum um 36 tímar, at fáa 270,- kr. til so drúgva fer má sigast at vera mannminkandi, sigur Annfinnur Garðalíð.

## Tryggingarviðurskiftini

Annfinnur setti sær eisini fyri at kanna tryggingarviðurskiftini, og um einkjan t.d. fór at fáa pening frá vanlukkutryggingini.

Tað eru nógvir spurningar at fáa greiðu á, „avstandurin" er langur, tungumálið og viðurskiftini nógv øðrvísi enn okkara.

Umsíðir eydnaðist at fáa vígslubræv og faðirskapsjáttan hjá barninum. Men hetta vísti seg ikki at vera nøktandi.

Vanlukkutryggingin kravdi, at myndugleikarnir á staðnum skuldu vátta, at tey vóru gift og áttu dóttrina saman, sama dag, sum vanlukkan hendi.

Annfinnur greiður frá, at samskift hevur verið við telduposti, nógv er skrivað aftur og fram, men tað hevur nú eydnast at fáa tey neyðugu skjølini.

Men av tí, at málsviðgerðin ikki er liðug, er einkjan biðin um, at søkja um forskot uppá tryggingarupphæddina.

Men í skrivandi løtu, 1. juli 2014, hevur hon enn ikki fingið nakran pening.

## Um lønarviðurskiftini

Saefundin Hasanah var bátsformaður umborð á Anitu. Mánaðarlønin hjá honum var 850 dollarar um mánaðin. Hetta svarar til umleið 4.500,- kr.

Mánaðarlønin hjá einum vanligum dekkara var umleið 2.500,- kr.

Hetta er minni enn helvtin av minstulønini, sum altjóðafelagsskapurin ILO hevur ásett.

Einkjan hevur upplýst, at maðurin hevur fingið tvær mánaðarlønir í 2014.

## Einkjan skrivar í teldubrævið, dagfest 22. juni 2014, m.a. soleiðis til Annfinn Garðalíð:

### 7. januar 2014

Henda dagin fór maður mín undir sína seinastu ferð, burtur í onnur lond at forvinna familjuni til lívsins uppihald.

So kom løtan, síðsta útkall hoyrist í hátalarunum á flogvøllinum. Vit fingu tað síðsta klemmið og so mátti hann fara.



*Tey trý: Saefundin, konan og dótturin.*

Tað var tungt, gráturin sveið í eygunum. Meðan maður mín gongur vendir hann sær ímóti okkum, vinkar og smílist. Tá visti ongin, at hetta var hansara seinasta farvæl. Eg gloymi aldrin smílið, sum hann sendi, áðrenn hann bleiv burtur á flogvøllinum saman við skipsfeløgum sínum.

### 9. februar 2014

Henda dagin ringdi telefonin, eg var spent, kanska er tað maður mín hugsaði eg, eg vónaði, at tað var hann. Tað var fantastiskt at frætta frá honum, at hoyra rødd hansara, og at alt stóð væl til. Hann segði við meg, minst til at biðja fyri mær, at eg má koma trygt heim aftur til tykkum bæði.

### 12. februar 2014

Tá ringdi telefonin aftur, og eg vónaði, at tað var maður mín, men tað var ikki hann. Tað vísti seg at vera ein av skipsfeløgunum hjá manninum, sum boðaði mær frá, at maður mín hevði verið fyri eini vanlukku. Hann var blivin fastur í reiðskapinum, og varð tikin við út á sjógv, teir leitaðu eftir honum.

Kroppurin krepti seg saman, eg hugsaði, at hetta kann ikki passa, og so byrjaði gráturin – og óttin fyri - at hann ikki bleiv funnin aftur.

### 20. februar 2014

Henda dagin ringdi telefonin aftur. Eg visti ikki um eg skuldi gleða meg, ella vera kedd, sporini yvir til telefonina vóru tung. Tá eg tók telefonina, vísti tað seg at vera ein av skipsfeløgunum aftur. Hann sigur, at teir høvdu leita og leita, men uttan úrslit. Nú var staðfest, at maður mín var mistur og deyður á sjónum. Eg græt og græt, dóttirin spurdi meg, mamma hví grætur tú. Hvat skuldi eg svara? Eg svaraði, mamma er eym um eyguni, dóttirin spurdi aftur, mamma, var tað babba, sum ringdi? Eg kláraði ikki fleiri spurningar, eg megnaði ikki at siga dóttrini, at pápi hennara var deyður.

Maður mín hevði ábyrgd fyri síni familju, eg vil minnast hann við stoltleika, soleiðis endar hon sína frágreiðing.

# Hátíðarhald í Vinnuháskúlanum

Fríggjadagin, 27. juni 2014, vóru 51 prógv handað í Vinnuháskúlanum. Tað er altíð ein hátíðardagur hjá teimum, sum hava staðið próvtøkuna og familjum teirra, og tí er eisini altíð nógv fólk komið saman í Vinnuháskúlanum, tá ið prógv verða handað.Omanfyri 250 fólk vóru komin saman hesa hátíðarløtuna.

Prógv vóru handa skiparum, skipsførarum og maskinmeistarum.

## Skiparaprógv við 10,6 í miðal

Sum siðvenja er so verða eisini virðislønir latnar ein slíkan dag í Vinnuháskúlanum.

Ein av virðislønunum varð latin av Føroya Skipara- og Navigatørfelag, fyri navigatørprógv við hægsta miðaltalið. Eyðstein Djurhuus handaði Finn Hentze, hesa heiðursløn, ið hann fekk fyri skiparaprógv við 10,6 í miðal. Umframt hesa heiðursløn fekk Finn Hentze Kikara frá p/f Thor.

Aftanfyri mannin, ið fekk hesar báðar virðislønir, er ein áhugaverd søga um ein búskaparfrøðing við sergrein í fiskivinnu.

Finn er ættaður av Sandi, men flutti til Danmarkar saman við foreldrunum, tá ið hann hevði gingið eitt ár á Føroya Studentaskúla. Tí hevur hann danskt studentsprógv. Tá ið hann frætti, at tað var møguligt at lesa fiskivinnubúskaparfrøði í Bodø søkti hann og flutti til Norra.

Eftir loknan lestur flutti Finn til Grønlands har hann hevði fingið stjórastarv hjá Godthåbs Fiskeindustri. Tá ið farið var at útbyggja og modernisera øll flakavirkini í Vesturgrønlandi var heitt á hann um at leggja hetta arbeiði til rættis.



Eyðstein Djurhuus handar Finn Hentze virðisløn frá Skipara- og Navigatørfelagnum.

## Úr Grønlandi til Namibia

Tá ið arbeiði í Grønlandi var um at vera liðugt lýsti ein fiskivinnufyritøka í Namibia eitt starv leyst, ið teir nevndu „operation manager".

Finn søkti og var settur í starv í Walvis Bay í 1999. Hetta var ein fyritøka, sum átti 11 trolarar og 2 flakavirkir í Namibia.

Í fyritøkuni arbeiddu um 1.000 fólk, og var tað arbeiðið hjá teimum, sum hann skuldi leggja til rættis, og hava ábyrgdina av. Finn greiður frá, at tað vóru áhugaverd ár. Ein stórur partur av starvsfólkunum vóru uppvaksin í einum samfelag uttan penging. Hjá teimum hevði meginreglan verið, at ein vøra var býtt um við eina aðra vøru. Tí dugdu ikki øll at liva eitt lív, sum fyri okkum er sjálvsagt. Og tað skapti sjálvandi trupulleikar hjá einum parti av starvsfólkunum.

## Hevur egna fyritøku

Í 2005 stovnar Finn egna fyritøku, sum veitir ráðgeving í sambandi við framleiðslu av fiskavørum. Í hesum sambandi hevur hann arbeitt um allan heim. Hann nevnir t.d. Suðurafrika, Kina, Kanada, Maleisia, Póland, Litava, Estland, Marokko, Ukreina, Íslandi, Skotlandi, Noreg og Danmark. Og sum tú veit, leggur hann afturat, so ber væl til at arbeiða uttan at vera staddur á arbeiðsplássinum.

Tá ið hann byrjaði á Vinnuháskúlanum hevði hann ikki búð í Føroyum í 24 ár.

Av tí sama var karakterurin í føroyskum ikki góður, sigur hann lítillátin.

Hann hevur ofta hugsað um at fáa sær eina navigatørútbúgving, og vónar at sleppa at royna seg onkuntíð umborð á skipi. Meðan hann hevur verið í Føroyum hevur hann ikki sitið nógv á skúlabonki, eitt skifti hevur hann arbeitt fyri Kollafjørð Pelagic, og so hevur hann eisini roynt seg sum hýruvognsførara. Vit ynskja Finn Hentze tillukku við skiparapróvnum.

Skiparar:



Arnold Hjelm (ikki við á myndini)
Finn Hentze
John Reidar Winther
Herman Johan Dam
Bjørn Johannesen á Lag
Jón Poulsen
Gunn Danielsen
Petur Liliendahl Hansen
Karl Danielsen
Terji Hjaltalin á Kamarinum
Tummas Petur Bisp

Skipsførarar:



Brian Hansen
Heri Rein
Hanus Ingi Hansen
Hilmar Uni Antoniussen
Andreas Joensen Dahl
Jógvan Ingvar Olsen
Asbjørn Selfoss
Kartsin Vang
Bjarki Hansen
Martin Matras Schmidt
Búgvi Thomsen
Ólavur Jacobsen
Eli Fróði Hansen
Pauli Steinberg
Eron Hallmarsson Winther
Robert Svartá Wardum
Eyðfinn Ljósstein
Rógvi Sveinsson
Gunnar Olsen
Magnus Jacobsen
Hans Jacob Joensen
Egil Finnsson
William Højgaard

# Virðislønir:

**Maskinmeistarar:**

**Bárður Andreassen**
fototól frá Suðuroya Sparikassa

**John Martin Andreasen**
mátitól frá Maskinmeistarafelagnum

**Sigurð Mohr**
lummaur frá Áhugafelagnum Antares

**Andrass Hammershaimb Poulsen**
gull ur frá A. P. Møller

**Skipsførarar:**

**Finn Hentze**
kikara frá P/F Thor

**Karl Danielsen**
barometur og klokkusett frá Faroe Ship

**Jón Poulsen**
barometur og klokka frá Faroe Agency

**Bjørn Johansen á Lag**
lummaur frá Áhugafelagagnum Antares

**Skiparar:**

**Hanus Ingi Hansen**
gull ur frá A. P. Møller

**Andreas Joensen Dahl**
klokkusett frá Tryggingarfelagnum Føroyar

**Egil Finnsson**
lummaur frá Antares

**Egil Finnsson**
ur, kvív og pennasett frá Søfartens Ledere

Harumframt fekk Finn Hentze virðisløn fyri hægsta próvtal hjá navigatørunum: sekstantur frá Skipara- og Navigatørfelagnum.




Pætur Rein Jensen
Heini á Fjallinum
Andrass H. Poulsen
Harald Kristoffer Haraldsen
Sigurð Mohr
Hallstein Eivindarsonur Jacobsen

John Martin Andreasen
Heorg Sólbjørn Múller
Joen Pauli G. Høgnesen
Flóðin Váðklett
Jákup Poulsen Dalsgarð
Eyðstein Berg í Lágabø

Jákup Meinhard Jacobsen
Búgvi Ólavsson Eliasen
Bárður Andreassen
Rúni Christiansen
Sigurð Mohr

## Andrass H. Poulsen nýklaktur maskinmeistari hugleiðir:

# Ikki var nokk at liva fyri

Tað var ein gleðisdagur, tá bilmekanikaraútbúgvingin endiliga varð liðug í 2010. Um hetta mundið hevði man eisini fingið damu, og mín sann vóru eisini tey gleðiboð, at hon var vorðin við barn.

Tað skuldi verða gott at koma burturúr teimum trongu korunum, sum lærlingalønin rakk til. Men tað var skjótt at sveinalønin eisini byrjaði at svinna og heldur ikki var nokk.

Hvat ger man so nú, tá ið man umsíðir er liðugur, og ikki var nokk av peningi til at liva fyri allíkavæl við barnagarði, barnaútgerð, leigu, streym, olju og bili.



Andrass H. Poulsen
nýklæktur maskinmeistari

### Gamli hjá mær maskinmeistari

Fór tá at hugleiða aftur um samrøðurnar við maskinmeistarar/skiparar, sum komu inn á verkstaðið við sínum nýggja Mercedes-bili, og ikki minst søgurnar um pengarnar, sum vóru eftir aftaná at alt var goldið. Eisini er gamli hjá mær maskinmeistari, og ofta sat eg sum yngri, fasineraður og lurtaði, tá hann segði frá um verðina, og tað, sum situr mest fast, var tíðin við Global Chemical Tankers-bátunum.

### Nikka/sova og læra

Søkt bleiv inn á Vinnuháskúlan í góðari tíð, og svarið var játtandi um at byrja í august 2011, sum maskinmeistaralesandi. Og tað mátti tað jú verða, tí um man kanska ikki akkurát vildi sigla, so eru tað nógvir aðrir møguleikar, sum eisini verða opnaðir við at fara henda vegin.

Áðrenn hetta hevði man tosað nógv við damuna og familjuna um at byrja á skúlanum, tí tað krevur nógv av næminginum. Tað tyngsta fyri meg var at umstilla meg frá at vera aktivur allan dagin (arbeiða) til at sita í friði og lurta. Fyrsta hálva árið fór mest við at nikka/sova og læra, allar hesar ymisku næmingarnar at kenna.

### Navigatørar og maskinmeistarar

Tað var skjótt at man lærdi, at tað var ein djúp gjógv millum navigatørar og maskinmeistarar, og hetta vóru lærarnir, sum eisini á ein hátt prentaðu tað inn í næmingarnar. Uttan so, at tú kendi ein á „hinari" síðuni áðrenn, so fór nokk ikki nakað nýtt vinarband at standast burturúr har.

Millum maskinmeistarar verður sagt sum skemt, at navigatør er nakað man tekur í steðginum millum tímarnar, og grundin til, at teir ikki fara til maskinmeistara er hon, at teimum dámar betri at vera „vindeygaskikkarar". Uttan iva hava navigatørarnir eisini okkurt, sum teir flenna eftir viðvíkjandi maskinmeistarum.

Sum maskinmeistaralesandi hevur man jú nógv el, og oftani verður sagt, at tað er her, at menninir fella, og soleiðis hevur eisini verið hjá

okkum. Tað hevur uttan iva verið tann tyngsta lærugreinin at bera og serliga tí, at hon fevnir so vítt. Ellærugreinin er gjøgnum øll 6 hálvárini, og dumpar tú tíðliga í hesum, er til tíðir ringt at koma burturúr aftur.

### Tímarnir ofta ótrúliga stuttligir

Tímarnir blíva ofta ótrúliga stuttligir, tí ein vanligur flokkur verður jú samansettur av fólki úr øllum landinum. Prikini blíva altíð góð, og serliga var tað Hallur Winther, sum vit høvdu til at prika lærararnar, og trúgv mær, tað dugir hann heilt ótrúliga væl.

Saman hava vit roynt at hjálpt hvørjum øðrum gjøgnum dagarnar og innlatingarnar. Tað er ofta soleiðis, at tað „simpulten" ikki er tíð til at gera eina innlating og tá hevur aldri staðið á at deilast um "notatir" og frágreiðingar, og hetta eru nokk allir glaðir fyri í dag.

### Stórur saknur í samanhaldinum

Nú eg hugsi aftur á farna tíð, meðan hetta verður skrivað, kann ikki umgangast, at eitt smíl kemur fram. Tað hevur til tíðir verið heilt ótrúliga strævið, men eisini heilt ótrúliga stuttligt. Uttan iva verður stórur saknur í samanhaldinum, sum bleiv skapt, nú henda skúlatíðin er liðug.

Hjá mær hevur tað havt ótrúliga stóran týdning, at daman eisini var klár yvir, hvat henda útbúgvingin kravdi av mær, tí uttan hana og familjur okkara aftanfyri okkum hevði úrslitið ikki blivið so gott, sum tað nú bleiv og alt klárað uppá normeraða tíð.

Hvat framtíðin hevur at bjóða eri eg spentur uppá. Leiðina vil eg helst hava at ganga móti oljuvinnuni ella handilsflotanum, og fái eg møguleika aðra staðni, so eri eg ikki kræsin fyri at fáa siglingstíðina.

*Til allar sum fingu handað prógv 27/6-14 vil eg ynskja hjartaliga til lukku og góða eydnu framyvir.*

# Nýggi skúlastjórin Wilhelm Petersen:

## Eg helli mest til ein bachelor yvirbygning

Tosið um at uppstiga útbúgvingarnar hjá Vinnuháskúlanum til bachelorstøði tekur eina nýggja vend við Wilhelm E. Petersen sum skúlastjóra.

– Vit skulu virða teir karmar, sum í dag eru um útbúgvingarnar til skipsførara og maskinmeistara. Útbúgvingarnar ella skúlarnir eru ávikavist 120 og 50 ára gamlir, og tær hava hesi árini givið heilt nógvum føroyingum ein vinnuførleika, sum er kendur langt út um landoddarnar. Tað er ikki ókent, at næmingar á skúlanum hava fingið starv, áðrenn teir eru lidnir at lesa. So vit skulu vera sera varin, áðrenn vit fara at broyta ov nógv. Vit skulu vita, hvat vit fara eftir, tá ið vit broyta. Orðini eigur Wilhelm Petersen, sum 1. desember 2013 byrjaði í starvinum sum stjóri á Vinnuháskúlanum.

Wilhelm Petersen er fyri at uppstiga útbúgvingarnar á Vinnuháskúlanum, so tær eru á jøvnum føti við útbúgvingar, sum líknandi skúlar uttanlands hava at bjóða. Vit skulu hava flaggskipið, sum er til tey, ið vilja fara allan vegin. Men samstundis skulu vit ikki gloyma hvat tað er, sum hevur gjørt skúlan, ella rættari útbúgvingarnar, ið skúlin bjóðar, til tað, sum tær eru.

### Stór menning

Sjóvinna hevur av álvara tikið dik á seg seinastu árini. Oljuvinnan hevur flutt seg út á sjógvin, mongdirnar av farmi vaksa. Føðin til heimsins alsamt vaksandi fólkatal kemur í størri og størri mun úr sjónum. Vaksandi samskiftið gongur gjøgnum ljósleiðarar, sum liggja eftir havbotninum, veðurlagsbroytingar gera, at nýggjar siglingarleiðir lata seg upp, orka verður vunnin úr vindi á havinum og tað er bara spurningur um tíð, til vit eisini hava tamt sjóvarfallið. Tann lutfalsliga stóri parturin av klótuni, sum er hav, fær alsamt størri og størri týdning í okkara lívi. Tí er tað natúrligt, at hetta eisini ávirkar ein skúla sum Vinnuháskúlan, sum í stóran mun byggir á útbúgving av maskinmeistarum og navigatørum. Og tí er tað eisini natúrligt, at krøvini til skúlan, og tey, sum nema sær lærdóm á skúlanum, eisini økjast.

– Heilt ítøkiliga sæst tað aftur soleiðis, at áhugin fyri okkum sum skúla veksur heldur enn minkar. Og vit merkja ein eftirspurning frá



Wilhelm G. Petersen, skúlastjóri.

næmingunum, eftir størri vitan. Teir fylgja við hvat hendir úti í stóru verð og geva okkum fakligt mótspæl, sigur Wilhelm Petersen.

Útbúgvingarnar byggja á gamlar skipanir, sum eru mentar ígjøgnum nógv ár, og tað skal virðast, heldur hann. Men tíðin stendur ikki í stað, og vit mugu førka okkum sama veg sum hini. Og ongin sigur, at vit ikki skulu taka stigið fult út, og lata tey, sum hava vilja, evni og hegni, sleppa allan vegin og taka eina útbúgving, sum er á altjóða støði og sum Vinnuháskúlin stendur fyri í samstarvi við Fróðskaparsetrið, er hugsunarhátturin hjá vinnuháskúlastjóranum.

### Greið ætlan

Tað er týðuligt, at Wilhelm Petersen ikki ætlar at sleppa bestu næmingunum uppá fjall. Men hann ætlar heldur ikki at gera eina skipan meinlík teirri donsku, við professiónsbachelorum, bara tí at tað kanska kann tykjast at vera tann lættasta her-og-nú loysnin. Danir hava verið í eini tilgongd, har teir hava harmoniserað sínar útbúgvingar við ES útbúgvingar, so eitt nú stigaskipanir eru tær somu og umsitingin verður lættari.

– Í míni verð skulu vit vita, hví vit gera tað, sum vit gera. Vit skulu ikki bara broyta fyri at broyta. Tað skal vera ein tilgongd, har vit seta orð á innihaldið. Eg meini, vit skulu arbeiða fram ímóti, at ein akademiskur partur skal liggja aftaná sjálva útbúgvingina, tað verið seg til maskinmeistara ella skipsførara. Tað vil siga, at vit í samstarvi við Fróðskaparsetrið geva útbúgvingini ein akademiskan yvirbygning, sum næmingarnir kunnu velja, hava teir hug og evni til tað, sigur Wilhelm Petersen.

Sostatt vil hann eisini varðveita útbúgvingarnar, sum vit kenna tær í dag.

– Men fer tað ikki at leingja útbúgvingina munandi fyri tey, sum velja at fara allan vegin og gerast bachelor?

– Jú, um vit ikki broyta upptøkukrøvini. Um vit hugsa okkum, at tað verður stillað sum krav, at umsøkjarar til Vinnuháskúlan skulu hava miðnámsútbúgving fyri at sleppa inn. Tað verður gjørt aðrastaðni, eitt nú í Danmark. Og harvið skal næmingurin ikki byrja á botni á sama hátt sum í dag.

– Hvussu er skúlin fyri at gera hesa broyting?

– Har liggur ein avbjóðing, sum vit skulu at taka ímóti. Men eg síggi tað ikki sum nakra ómøguliga uppgávu. Onki er ókeypis, og tað er eitt stórt tak, men hinvegin fer tað eisini at geva okkum tann vinning, at støðið hjá skúlanum sum heild verður lyft. Vit høvdu fingið eitt flaggskip, og teir bestu næmingarnir høvdu soleiðis verið við til at lyft alt støðið hjá skúlanum, Wilhelm Petersen vísir á, at tað á lærdum háskúlum eru tey Ph.d. lesandi, sum „draga alt lessið".

– Nær sært tú fyri tær, at hetta verður veruleiki?

– Tað er ringt at siga. Fyrsta stigið er at blíva samd um eina skipan og fáa neyðugu lærararnar til at undirvísa. Eg havi ilt við at seta áramál á, men tað eru vit, sum hava bóltin, tað er greitt, sigur Wilhelm

### Bachelor útbúgving

Vanliga verður sagt, at tað eru tvey sløg av bachelorum. Professiónsbachelorar og akademiskir bachelorar. Hesir seinnu eru teir meiri siðbundnu, sum hava nomið sína vitan á lærdum háskúla (universiteti) har ein ávís gransking liggur sum grund fyri endaliga prógvinum.

Professiónsbachelorar hava gingið í einum skúla, sum er meira praktiskt orienteraður.

Sum dømi kann nevnast, at tey, sum lesa til lærara ella sjúkrarøktarfrøðing í Føroyum fáa prógv sum akademiskir bachelorar.

Tað sama er galdandi í donsku útbúgvingini til skipsførara ella maskinmeistara.

Wilhelm Petersen greiðir frá, at hann – í samstarvi við Fróðskaparsetur Føroya – kundi hugsa sær, at Vinnuháskúlin bjóðar bestu næmingunum akademiskar bachelorútbúgvingar.



*Komandi skúlaár byrja 120 næmingar á skúlanum, tað er met.*

Petersen, sum sjálvur kennir akademiska umhvørvið væl. – Tað er týdningarmikið at hjúkla um tey framfýsnu, tey við ambitiónunum, tí tað er frammi í oddinum, at støðið verður lagt. Krøvini til hesar næmingarnar eru strong, og ongar neyðloysnir verða góðtiknar. Tað má ikki henda, at vit missa næmingar til skúlar uttanlands, tí fakliga avbjóðingin her er ov lítil, sigur hann.

## Fleiri stóðu eftir

Eitt tilboð til næmingarnar um at gerast bachelorar er tó ikki einasta avbjóðingin, sum nýggi Vinnuháskúlastjórin stendur við. Í januar byrjaðu sjey næmingar á skiparaskúla, men 11 aðrir, sum eisini fegnir vildu byrja, sluppu ikki inn, tí teir høvdu ikki kravdu siglingstíðina

Trupulleikin er, at skipini, sum kunnu geva monnum neyðugu siglingstíðina, gerast bara færri og færri. Ein aspirantskipan hevur verið ávegis, men er ikki komin undir land av ymsum orsøkum. Wilhelm Petersen heldur kortini, at tað er ein slík skipan, sum skal til, fyri at ganga eftirspurninginum eftir siglingstíð á møti.

– Ein aspirantskipan er ikki ein óskipað tilgongd, sum vanlig siðbundin siglingstíð kann vera. Tú veitst, at aspiranturin dugur nøkur grundleggjandi ting, tá hann er liðugur, og soleiðis ber til at stytta siglingstíðina við eini helvt, sigur Wilhelm Petersen. Hann heldur, at tað vildi verið náturligt, at skúlin hevði sín virkna leiklut í eini slíkari skipan.

### Fakta um stjóran á Vinnuháskúlanum

Wilhelm Eyðinsson Petersen traðkaði barnaskógvarnar í Gørðum í Vestmanna. Hann er sonur Eyðin og Anni Petersen. Tey eru 8 systkin, – Wilhelm er næstelstur.

Eftir lokna skúlagongd í Føroyum tók hann útbúgving sum civilverkfrøðingur í maskinlinjuni frá DTU. Høvuðsritgerðina gjørdi hann saman við MAN B&W, sum snúði seg um „feildiagnostisering" av stórum dieselmotorum, og arbeiddi eftir tað í hálvtfjórða ár hjá Danmarks Tekniske Universitet (DTU) har hann gjørdi eina Ph.D. verkætlan. Samstundis las hann HD á Handilsháskúlanum í Keypmannahavn (CBS).

Heimafturkomin til Føroya eftir 10 ár í Danmark fór hann í starv hjá Føroya Sparikassa, har hann var „Kredittleiðari" í gott 6 ár.

Í 12 ár var hann stjóri í føroyska oljufelagnum Atlantic Petroleum har hann frá fyrsta degi stóð fyri at byggja fyritøkuna upp úr ongum, eitt framleiðandi oljufelag, sum varð skrásett á partabrævamarknaðinum Nasdaq OMX.

Wilhelm Petersen byrjaði at undirvísa á Vinnuháskúlanum í august 2012, har hann í dag er skúlastjóri.

Wilhelm hevur havt álitisstørv í fleiri nevndum, í løtuni í nevndini í Effo og felagnum Defined Energy, sum er eitt nýtt felag, sum arbeiðir við orkusparing.

Wilhelm er giftur við Joan M. Petersen og tey eiga 3 børn, Jeanni og Lindis, sum eru tvíburðar og 24 ára gamlar og Rana, sum er 16 ára gamal.




Maskinistur | Maskinmeistari | Skipari | Skipsførari



# Spennandi og fjølbroyttar útbúgvingar

## og eitt hav av eftirútbúgvingarmøguleikum

**Dømi um skeið:**

1 ARPA skeið
ARPA Automatic Radar Plotting Aids

2 GOC (Generelt og endurnýggjan)
GOC General Operator Certificate (NEW)

3 Tankers Safety serskeið fyri olju-gas- og kemikaliutangakip
Tankers Safety, special course for oil-, gas- and chemical tankers

4 Flutningur av vandamiklum farmi
Transport of dangerous goods in dry cargo ships

5 Eftirútbúgving sum sjúkraviðgeri (Heilsulæra)
Supplementary training in medical proficiency

6 ECDIS (elektroniskt sjókort)
Course in Elektronic Cart Display Indication System

7 SSO-skeið
Course for Ship Security Officers

8 Fult trygdarskeið fyri sjómenn. STCW A-VI/1-1,A-VI/1-2, A-VI/1-3,A-VI/1-4
Basic safety training

9 Bátaføraraskeið. STCW A-VI/2-1
Proficiensy in Servival Craft and Rescue boats

10 Bridge Resource Management
Bridge Resource Management

*Set teg í samband við skúlan og hoyr nærri.*

KREA

Nóatún 7 · FO-100 Tórshavn
Tel 350 250 · Faks 350 251
info@vh.fo · www.vh.fo

VINNUHÁSKÚLIN
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

Vinnuháskúlin er ein nútímans skúli við serkønum lærarum í øllum lærugreinum, eins og skúlin hevur allar teir hentleikar og útbúnað, sum skulu til fyri at gera útbúgvingina áhugaverda og góða. Útbúgvingarnar á Vinnuháskúlanum eru góðkendar av Føroya Landsstýri, Søfartsstyrelsen og IMO.

# Tín eftirløn tryggjar tær eitt virðiligt LÍV

Hóast tú í gerandisdegnum ikki hugsar um eftirløn og tryggingar, so hevur hetta stóran týdning fyri teg.

Rætta eftirlønarskipanin, trygging við óarbeiðsføri og ein lívstrygging lættir tær um tilveruna, tá tú leggur frá tær, tryggjar tær eitt virðiligt lív, um tú missir førleikan, og tryggjar tey, ið sita eftir, um tú leggur árarnar inn ov tíðliga.

LÍV er Føroya elsta og størsta eftirlønar- og lívstryggingarfelag við yvir 22.000 eftirlønaravtalum. Við einum starvsfólkaliði við drúgvum royndum og hægstu útbúgvingum og serfrøði á økinum tryggja vit kundum okkara eina trygga eftirløn og munagóðar tryggingar í einum samhaldsføstum felagi.

Samstundis ger støddin okkum før fyri at umsita íløgurnar uttan dýrkandi millumlið. Hetta gevur hægri avkast og lægri umsitingargjøld.

– Trygg eftirløn

ekka.fo